

ÁRSRIT

# 2020

TJÓÐSAVNIÐ

FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM

NATURE AND CULTURE




*Mynd: Adam Woolfitt; frá serframsýningin "Gløgt er gestsins eyga"*


**TJÓÐSAVNIÐ** Ársrit 2020
Lagt til rættis: Savna
Snið og uppseting:
Pætur Eyðunsson Jensen / Droym.fo
Prent og liðuggerð: Føroyaprent
Forsíða: Adam Woolfitt

Svanamerktur prentlutur 541 705


## INNIHALDSYVIRLIT


6 Gripurin hendan mánaðin
7 QR-kodur til Hoyvíksgarð
8 Serligu summartiltøkini á Tjóðsavninum
10 Livandi savnsmiðlan – Skattaveiða á Skansanum
11 Serframsýningin "Gløgt er gestsins eyga", National Geographic í Føroyum
12 Savnsfagnaðurin 2020
14 Komandi ferðaleiðar fingu undirvísing á Tjóðsavninum
13 Landsstýrismaðurin á vitjan
15 Tjóðsavnið var við á Jobmatch 2020
16 Eldur í á Tjóðsavninum
17 Hoyvíksgarður málaður og tjøraður
18 Verkætlanin at varðveita hvalastøðina við Áir
27 Fornfrøðiligir útgrevstrar í 2020
32 Bakkaverjur og varðveitingararbeiði í 2020 – Bakkaverjur at verja fornminnini
34 Hvussu hevur korona ávirkað viðurskiftini í Koltri?
34 Náttúran í Koltri
39 Gransking av várflugum í Føroyum
40 6 nýggj sløg av súgkjaftum
42 Ringmerking í Føroyum 2020
44 Fuglakanningar á Ramsarøkjum í 2020
46 Fuglateljing yviri við Strond
48 Beinagrind av nevhvali varðveitt
50 Studentaarbeiði á Sjódjórdeildini
51 Ruddingarátak á goymsluni í Kaldbak
52 Tjóðsavnið skal umsita UNESCO sáttmálan um verju av siðaarvi
54 Nýggjur botaniskur urtagarður í Hoyvík
56 Minnistalvan í gomlu kirkjuni á Nesi
58 Fornminnisnevndin
59 Praksislæra á tjóðsavninum
60 Varðveitingararbeiðið í Stokkastovuni í Tinganesi
61 Tveir seyðir skrædlaðir
62 Seminar um Stokkastovuna í Tinganesi
63 Skeið í foto og fokusstakking
64 Tjóðsavnið vitjar á Tórshavnar Býarsavni
65 SARA-skeið 2020
65 Oikos 2020
66 Starvsfólkadagar við Skálafjørðin
68 Miðlan 2020 / Útgávur
69 Tjóðsavnið í miðlunum 2020
72 Hátíðarhald fyri Símuni V. Arge
74 Símun millum ár og dag
76 Fimm starvsfólk vóru heiðrað
77 Summary in English




*Mynd: Adam Woolfitt; frá serframsýningin "Gløgt er gestsins eyga"*





## FORORÐ

**Sum hjá flest** øllum av landsins og heimsins søvnum var árið 2020 eitt sermerkt ár fyri Tjóðsavnið. 15. mars 2020 vóru starvsfólk savnsins biðin um at arbeiða heimanífrá, at taka írestandi feriu og avgreiða møguliga avspáking. Samstundis vóru tiltøk avlýst ella útsett, og framsýningar okkara lótu aftur. Tá støðan batnaði í mai, komu fólk aftur til arbeiðis á starvsstøðunum, og framsýningarnar lótu uppaftur, tó við øllum koronutilmælunum í huga. Sum hjá øllum øðrum í Føroyum, sum fingust við ferðafólk og upplivingarvinnu, so væntaðu vit á Tjóðsavninum í 2020 metár í mun til vitjanartal. Hetta bleiv so ikki, men eftir umstøðunum fingu vit kortini fitt av vitjandi – bæði føroyingar og útlendingar.

**Koronastøðan ávirkaði eisini** tær ætlanir, vit høvdu fyri árið. M.a. var ein nýggj framsýning um ull útsett eitt ár, og ætlanin at ferðast kring landið við einari myndaframsýning var slept.

**Men sum orðafellið** sigur "har ein hurð fer aftur, fer ein onnur upp". Soleiðis var eisini á Tjóðsavninum. Tá framsýningarvirksemið varð skert, ráðlagdar ráðstevnur avlýstar og somuleiðis allar uttanlandsvitjanir, var orka og peningur til annað virksemi.

**Ynskið at grunda** ein botaniskan urtagarð í Hoyvík gjørdist veruleiki, og ætlanin er at taka urtagarðin alment í nýtslu summarið 2021. Nógvar ábøtur vóru gjørdar á søguligu bygningar okkara bæði innan og uttan, og eisini vóru ábøtur gjørdar í framsýningini og goymslum savnsins.

**Hóast fleiri ráðlagdar** framsýningar ikki gjørdust veruleiki, hildu vit fast í einari stórari myndaframsýning við myndum hjá bretska myndamanninum Adam Woolfit. Koronustøðan var hampulig summarið 2020, og tí var mett ráðiligt at hava framsýningina í rúmligu hølunum í Finsen.

**Visit Faroe Islands** gjørdi eitt átak summarið 2020 við heitinum "Ferðist í egnum landi". Hetta var fyri at stuðla føroysku ferðavinnuni, men eisini fyri at geva føroyingum frítíðarupplivingar í Føroyum, nú umstøðurnar at ferðast uttanlands vóru vánaligar. Hetta tóku vit á Tjóðsavninum til okkum, og í samstarvi við Visit Tórshavn skipaðu vit fyri summartiltøkum, har føroyingar fingu møguleikan saman við einum serfrøðingi á Tjóðsavninum at uppliva føroyska náttúru og føroyska søgu. Tjóðsavnið bjóðaði føroyingum 9 ymisk tiltøk, tey vóru: blómutúrar, skordýratúrar, fuglatúrar, taratúrar, fjørutúrar, rundvísing í Kirkjubø, rundvísingar á Hoyvíksgarði, rundvísing á fornfrøðiliga grevstrinum á Velbastað og sjórænaraspøl á Skansanum.

**Eitt av størstu** árligu tiltøkunum á Tjóðsavninum er savnsfagnaðurin, sum er í heystfrítíðini. Hesir plagdu at vera stuttligir og rokaligir dagar við einum stórum tali av vitjandi – serliga børnum. Ikki bar til at halda tiltakið sum vit plaga, men avrátt var saman við koronuráðgevingini at loyva 100 fólkum inn í senn. Hetta var skipað við tilmelding. Royndirnar við hesum vóru sera góðar. Vit fingu ikki sama tal av vitjandi sum undanfarin ár, men harafturímóti fingu vit meiri skipað viðurskifti og hægri góðsku á tilboðunum til tey vitjandi.

**Nógv av virkseminum** á savninum var so at siga ikki ávirkað av koronukreppuni. Hetta kemur í stóran mun av, at summarhálvuna er sera nógv av virksemi savnsins uttandura í sambandi við feltarbeiði, kanningar og skrásetingar. Harafturat verður eisini nógv av arbeiðinum á savninum framt av einstaklingum á egnum skrivstovum og verkstovum.

**Samanumtikið var 2020** eitt sera virkið ár, men eisini eitt serligt ár, sum byrjaði sera trupult, men sum starvsfólkini á Tjóðsavninum við nýhugsan og kreativiteti vendu til nakað positivt!

**Herleif Hammer**
*stjóri*



*Lykilin og hamarin úr bøkjaraverkstaðnum við Áir*



Indiatítlingur

# GRIPURIN HENDAN MÁNAÐIN

## Í desembur 2019 byrjaði Tjóðsavnið eitt átak, ið kallast "Gripurin hendan mánaðin"

**Hugsanin aftanfyri átakið** var at siga Føroya fólki smásøgur, ið knýta seg at nøkrum av gripunum, vit arbeiða við, ella sum eru nýggir í savni okkara. Smásøgurnar skuldu saman við myndum leggjast á heimasíðu og á facebooksíðu Tjóðsavnsins. Ætlanin var at fáa eina nýggja søgu út á hesar miðlar hvønn ella annanhvønn mánað.

Í 2020 komu 8 smásøgur út á áðurnevndu miðlar. Talan er um søgur um gripir, sum lýsa tættir úr okkara náttúru og mentan. Gripirnir og søgurnar vóru sera ymiskar, og geva soleiðis eina góða mynd av, hvussu breitt og fjølbroytt arbeiðsøkið hjá Tjóðsavninum er.



*Priapulus Caudatus ella penis worm á enskum*



*Tekning av kvernu á Hvalastøðini við Áir*

Allar søgurnar kunnu lesast á
**www.tjodsavnid.fo**








# QR-kodur til Hoyvíksgarð

## Í summar var farið í holt við at seta QR-kodur upp við Hoyvíksgarð

**QR-koda er ein** máti at geva vitjandi upplýsingar um ymiskt. Við snildtelefon ber til at hoyra søgubrotini, sum verða lisin upp.

Í fyrsta umfari eru QR-kodurnar settar upp úti. Tær eru settar á gonguleiðina frá skeltinum uppi við vegin og oman á garðin. Tað er tó ikki neyðugt at ganga júst ta leiðina. QR-kodurnar eru ikki tengdar at hvørjari aðrari. 13 QR-kodur eru á strekkinum, og til hvørja kodu eru myndir, tekstur og ljóðbrot.

Í hesum umfarinum eru ljóðbrotini tó bert á føroyskum, men ætlanin er at leggja fleiri mál inn á kodurnar.













# SERLIGU SUMMAR-TILTØKINI Á TJÓÐSAVNINUM

Tá tað á vári 2020 gjørdist greitt, at tað fór at gerast trupult hjá føroyingum at fara uttanlands at ferðast, vaks tørvurin eftir upplivingum og tiltøkum fyri føroyingar í Føroyum. Á Tjóðsavninum dugdi mann at síggja, at virksemið summarhálvuna fór at vera munandi skert, tí ikki kundi roknast við nógvum ferðafólkum

**Tjóðsavnið hevur serfrøðingar** á fleiri ymiskum økjum, og harafturat ræður savnið yvir spennandi økjum, t.d. Skansanum í Havn og Hoyvíksgarði í Hoyvík. Sostatt høvdu vit á savninum góðar møguleikar at bjóða føroyingum spennandi og læruríkar upplivingar. Upplivingarnar skuldu vera hóskandi fyri øll – bæði ung og gomul – og bæði náttúra og mentan Føroya skuldi vera umboðað.

Tiltøkini vóru útboðin í samstarvi við Visit Tórshavn, sum við heimasíðu sínari tók sær av tilmeldingini.

## PLANTUR OG TARAR

**Fýra plantutúrar vóru** fyriskipaðir við Annleyg Patursson sum vegleiðara; ein við Toftavatn, ein við Norðskála og tveir í Hoyvík. Endamálið við plantutúrunum var at vísa luttakarunum okkara fjølbroytta plantuvøkstur. Hugt var eftir fleiri sjáldsomum plantum, men eisini var dentur lagdur á meiri vanligar plantur, sum vaksa í bøi, vegjaðara og veitum, sum vit ofta ikki geva okkum far um.

Tjóðsavnið gjørdi eisini eitt samstarv við taraserfrøðingin, Agnes Mols



Mortensen, um tveir taratúrar. Báðir túrarnir vóru í Fámjin í mølini vestan fyri kaiina. Endamálið við túrunum var at greiða frá um tara og taravøkstur, og at luttakararnir lærdu um taramargfeldið á staðnum. Eisini varð tosað um, hvørji sløg vóru vælegnað til matna.

## Í FJØRUNI

**Sjódýradeildin bjóðaði fólki** til tveir túrar í fjøruni; ein í Kaldbak og við Borðoyarvík. Tað gjørdist tó bara til annan túrin, tí ov fá høvdu teknað seg til túrin við Borðoyarvík. Avtalað var at møtast í Kaldbaksbotni og byrja túrin har. Við á túrinum vóru 4 børn og tvey vaksin umframt túrleiðaran og eitt hjálparfólk.

Endamálið var at geva fólki ein upplýsandi túr í fjøruni, bæði av tí sum vanliga er at finna, og so eisini tí, sum av tilvild skolar upp. Hugt var eftir skeljum, gággum, kúvingum, krabbum og krabbadýrum, gjari og bustumaðkum, tara, skónum og einstøkum plantum. Hjá børnunum var einki at ivast í, at teimum dámdi best at fáast við tað, sum kundi fangast. Serliga væl dámdi børnunum at fanga "grátt undir fjørusteini", sum er væl størri og flytir seg væl skjótari enn tey, vit síggja vanliga. Seinni parturin av túrinum var í fjøruni í Kaldbak. Túrurin var mettur at vara tveir tímar, men tá fólk fóru úr Kaldbak vóru meiri enn tríggir tímar farnir.

## FUGLAR OG SKORDÝR

**Deildin fyri djór** á landi skipaði fyri fuglatúrum og skordýratúrum. Tríggir fuglatúrar vóru fyriskipaðir millum Tjarnir omanfyri Loranstøðina á Eiði. Hetta staðið er heldur ókent fyri vanliga føroyingin, men hýsir einum heilt serstakum náttúrumargfeldi við m.a. hagalendi, lyngøkjum, vátlendi og tjarnum. Orsakað av hesum umhvørvisliga ymiskleika reiðrast nógv fjølbroytt fuglasløg í hesum lutfalsliga lítla stykkinum, og umframt mangar av okkara kendari fuglum finnast her eisini sjáldsom og hugtakandi sløg so sum reyðspógvi, tangspógvi, stelkur, helsareyði og lómur. Haraftrat er mestsum alt økið vallað og lætt at ganga hjá teimum allarflestu, so neyvan finst betri stað at geva vanliga føroyinginum innlit í føroyska fuglameingið.

Tveir skordýratúrar vóru fyriskipaðir. Í Sandavági varð ein túrur gingin úti í Dysjum. Her er lyngur, og gingið varð niðan við Skoragil. Luttakararnir fingu glúpar at fanga skordýr við, og eisini varð hugt undir steinar og vøllurin kannaður fyri at vita, hvat har mundi goyma seg. Her funnu luttakararnir m.a. *Micrelus ericae*, sum er ein trantklukka, sum livir í lyngi, og einans er 2 mm til støddar.

Við Lambafelli á Streymoynni funnu luttakararnir svartaklukkur og annað við at venda steinar. Ein roðavongur var eisini á flogi og settist har, vit kundu síggja hann. Tað slapst ikki undan, at luttakararnir eisini eygleiddu svarthálsurnar, ið reiðrast í økinum.

## HOYVÍKSGARÐUR OG FORNMINNI Í KIRKJUBØ

**Skipað varð fyri** trimum rundvísingum á Hoyvíksgarði. Byrjað varð í túninum frammanfyri bóndahúsini, har gomlu húsini Heima á Garði einaferð stóðu. Greitt varð eitt sindur frá søguni hjá bóndagarðinum, og síðani varð farið niðan fram við mataránni, har tosað varð um ánna og tey úthúsini, sum har eru. Veðrið var gott allar tríggjar dagarnar, so væl bar til at vera uttanfyri og greiða frá. Aftaná at hava hugt at úthúsunum niðanfyri bóndahúsini, varð farið inn. Inni varð greitt frá um húsini, nær tey vórðu bygd, útbygd, afturførd og um lívið á einum bóndagarði fyrr í tíðini.

Sera stórur áhugi var fyri túrunum, sum vóru fyriskipaðir í Kirkjubø. Símun V. Arge, sum stóð fyri varðveitingararbeiðinum á Múrin og Líkhús, greiddi fólki frá fornminnunum í Kirkjubø og søguni á staðnum. Dentur var lagdur á, hvussu Múrurin var bygdur, men eisini var komið inn á tey seinastu granskingarúrslitini í Kirkjubø. Túrurin endaði við einum drekkamunni í Kirkjubøgarði, har Jóannes Patursson var vertur.

## NIÐRI Á BAKKA Á VELBASTAÐ

**Á Bønhústoftini niðri** á Bakka á Velbastað vóru fimm spennandi og áhugaverdar rundvísingar av fornfrøðiliga útgrevstrinum á staðnum. Bønhúsið liggur tætt við sjóvarmálan og lendingina. Rundvísingin varð skipað í tríggjar partar. Fyrst greiddu fornfrøðingar frá um staðin Niðri á Bakka, um lendið, staðarnøvn og um verkætlanina og gransking av Bønhústoftum í Føroyum. Síðani varð farið oman á útgrevsturin, har víst varð á, hvar gólv og veggir vóru og eisini hvar gravir vóru funnar. Ymiskir gripir, sum vóru funnir í sambandi við grevsturin, vóru vístir fram. Rundvísingin endaði niðri á helluni, har víst var á, hvussu tætt bønhúsið liggur við sjóvarmálan, og tí er í vanda fyri at mástast burtur eins og tær ymisku fláirnar av jarðfrøði og búseting. Eftir rundvísingarnar fingu fólk høvi til at seta spurningar.









# Livandi savnsmiðlan

## SKATTAVEIÐA Á SKANSANUM

Í døgunum 21. – 24. juli bjóðaði Tjóðsavnið børnum í aldrinum 4-7 ár til eitt livandi savnsupplivilsi við heitinum 'Skattaveiða á Skansanum"

**Virksemið hjá Tjóðsavninum** fevnir breitt og hartil víða um landið. Umframt ta føstu framsýningina í Brekkutúni í Hoyvík er Skansin í Havn eisini partur av Tjóðsavninum.

Hvat kann vera betri enn at miðla ta stórslignu søguna um Skansan fyri børnum á sjálvum Skansanum? Á staðnum sóu og upplivdu børnini umhvørvið, har føroyingar hava vart Havnina. Við livandi savnsmiðlan vildu vit kveikja forvitnið og áhugan hjá børnunum um Skansan og Havnar søgu og samstundis geva teimum eitt øðrvísi savnsupplivilsi.

Skansin var karmur um livandi savnsmiðlan, har sjórænararnir Kaptain



Svartskegg og Kaptain Jack saman við børnunum fóru a eina vandaferð at leita eftir einum skatti. Børnini lærdu um Skansan og um lívið hjá einum sjórænara. Á ferðini vóru spurnarkappingar og forðingar av ymsum slagi, har børnini fingu høvi at røra seg og samstundis nýta sína nýfingnu vitan til at loysa alskyns uppgávur.

Tiltakið á Skansanum var ávirkað av koronu. Almennu tilmælini blivu fylgd. Tilmelding fór fram við plássi fyri í mesta lagi 20 luttakandi børnum hvørja fer. Tiltakið fekk sera góða undirtøku og var útselt eftir stuttari tíð. Veðrið var við okkum allar dagarnar.





# Serframsýningin "Gløgt er gestsins eyga", National Geographic í Føroyum



*Kvinnumóti á Eystanstevnu í 60-unum*

Á sumri 2018 fekk Tjóðsavnið stórt myndasavn frá enska fríyrkismyndamanninum, Adam Woolfitt, í gávu

**Myndirnar eru frá** 1968 og 1969 og lýsa føroysku náttúruna, gerandisdagin, arbeiðslívið og veitslulag. Myndirnar tók Adam fyri blaðið National Geographic – ein myndarøð av "eksotisku" Føroyum. Við serframsýningini "Gløgt er gestsins eyga" ynskti Tjóðsavnið saman við Adami at hátíðarhalda, at tað eru 50 ár síðani útgávan við føroysku myndunum kom út í 1970.

### EIN MYND SIGUR MEIRI ENN TÚSUND ORÐ – HVUSSU SO VIÐ 1500 MYNDUM?

Ein av avbjóðingunum í sambandi við serframsýningina var at velja 140 myndir av 1500. Myndirnar eru av sera høgari góðsku, allar litmyndir og fleiri teirra sum listaverk. Ynskiligt var at myndirnar umboðaðu allar Føroyar og føroyingar – at tær lýstu eina tíð, ið farin er – ein sannan tíðarlumma.

Gjøgnumgongdin av myndunum vísti týðiliga, at Adam hevur serlig evni at fanga løtuna og lýsa menniskjað í tí umhvørvi, tað livir. Tá hugsað verður um at Adam lítið og einki kendi til Føroyar, áðrenn National Geographic toymið gav honum uppgávuna, gerast føroysku myndirnar enn meira serstakar, og er tað her, heitið til serframsýningina "Gløgt er gestsins eyga" kemur.

23. juli - 9. august var aulan í Finsen karmur um serframsýningina. Ætlanin var at Adam Woolfitt við familju skuldi vera við til at lata serframsýningina upp, men Covid 19 og tilmæli forðaðu honum at ferðast úr Bretlandi, ið var læst orsakað av ov høga smittutrýstinum, ið tá var.

Adam gjørdi tí ein stuttfilm, har hann greiddi frá vitjan síni í Føroyum, hvussu hann upplivdi tað føroyska fólkið, náttúruna og mentanina síðst í trýssunum. Stuttfilmurin bleiv sýndur til upplatingina av serframsýningini. Høvi var at keypa myndirnar og koma við upplýsingum um støð og persónar á myndunum.

### HVØR ER ADAM WOOLFITT?

Adam Woolfitt er føddur í Onglandi í 1938. Longu sum 11 ára gamal tók hann eina avgerð um, at hann vildi gerast myndamaður. Adam tók útbúgving á Guilford College og arbeiddi millum annað sum myndamaður á einari lýsingarstovu og á blaðstovuni hjá The Telegraph í 6 ár. Júst tann starvsleiðin var ikki nakað fyri hann, og sum 28 ára gamal fekk hann fyrstu fríyrkisuppgávuna fyri myndablaðið National Geographic – og hevur hann tikið myndir fyri National Geographic í 30 ár.

Í sølubúð Tjóðsavnsins í Brekkutúni 6 í Hoyvík ber til at ogna sær fotomyndir hjá Adam Woolfit.



Hugnaligt var inni hjá andlitsmálarunum

# SAVNS-FAGNAÐURIN 2020

**Sum heild vóru fólk sera glað fyri savnsfagnaðin í 2020. Serliga væl dámdi teimum vitjandi at avmarking var á, hvussu nógv kundu vera inni í senn. Hetta gjørdi, at tað var minni larmur og lættari var at koma fram at ymisku tiltøkunum**




**Árið 2020 hjá** ST hevði plantur og plantuheilsu í brennideplinum.

Savnsfagnaðurin var ikki sum hann plagdi at vera. Árið 2020 var sermerkt í nógvar mátar orsakað av Covid-19 farsóttini. Nógv tilmæli komu frá myndugleikunum, og serliga tilmælið um frástøðu var eitt, sum fekk okkum at ivast, um vit skuldu halda savnsfagnað í 2020 ella ikki.

Í samráð við Koronuráðgevingina var avgjørt kortini at halda savnsfagnaðin - tó við nøkrum avmarkingum. 100 fólk kundu vera inni í framsýningini í senn, og fyri betri at halda skil á, hvussu nógv fólk komu, var avgjørt at hava tilmelding á netinum. Tilmeldingin var gjørd í samstarvi við Visit Tórshavn. Savnsfagnaðurin vardi teir fimm gerandisdagarnar í heystfrítíðini. Avgjørt var at deila dagarnar upp í tvey; frá klokkan 10:00 til 12:00 og frá klokkan 13:00 til 15:00. Tann fyrra tíðin var ætlað yngri børnum og tann seinna eldri børnum. Við hesum bar til at hava 200 fólk um dagin, og tað var fullteknað hvønn dag.

Á skránni var nógv ymiskt. Eitt blómuhorn var, har mann kundi gera sær eina stóra pappírsblómu. Andlitsmáling var eisini, og hon var sera væl umtókt. Málingin hevði eisini tann eginleikan, at hon kundi lýsa í myrkri. Tað riggaði sera væl, um farið varð inn í myrkarúmið við UV-lummalygtum. Alt, sum var inni í myrkarúminum, var málað við litum, sum skygdu, um mann lýsti á tað við lyktunum. Í erva var ein framsýning av plantumyndum, og har vóru eisini tvey støð, har mann kundi gita ymiskt. Í øðrum staðnum kundi mann gita, um ting vóru gjørd úr plantum, og í hinum kundi mann gita, hvørji tesløg vóru í nøkrum íløtum. Niðriundir var ein framsýning um plantuliting og ein um fotosyntesu. Eisini var ein filmur um søguna hjá eplinum vístur í einum lítlum biografi.

*Tær gera pappírsblómur*

At hyggja í sjóneyku eftir smákyktum og øðrum var aftur á skránni í ár eins og undanfarin ár, og tað var líka væl umtókt, sum tað plagar at vera.

Ein sjónleikur við Heiðu var fyrrapartin, og granskarasøgur vóru seinnapartin. Sjónleikurin við Heiðu var sera væl vitjaður av teimum smáu børnunum, og tey sungu og hugnaðu sær. Granskarasøgurnar løgdu eisini dent á plantur. Vit hoyrdu um torv, plantuleivdir í jarðfrøði og plantur í fornfrøði.

Umframt leysar uppgávur vóru uppgávuhefti við plantum sum evni.





*Sjónleikur við Heiðu*



# Komandi ferðaleiðar fingu undirvísing á Tjóðsavninum

Í sambandi við útbúgving sum ferðaleiðari í ferðavinnuni undirvístu fólk frá Tjóðsavninum skeiðsluttakarunum í fornfrøði, føroyskum fornminnum, búsetingarsøgu, byggihættum og siðaarvi

**Endamálið við undirvísingini** er, at ferðaleiðarar fáa eina grundleggjandi ástøðiliga vitan um føroyska fornfrøði, eina dagførda vitan um fornfrøðina í Føroyum og arbeiðið hjá Tjóðsavninum innan fornfrøði. Umframt undirvísingina varð skipað fyri rundvísing í framsýningini í Brekkutúni, Hoyvíksgarði og Kirkjubømúrinum fyri at geva skeiðsluttakarunum eina hollan vitan um fornfrøði í Føroyum. Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús, fornfrøðingur, stóð fyri undirvísingini um fornfrøði í Føroyum, Tórarinn N. á Rípuni, savnslærari, vísti runt í framsýningini hjá Tjóðsavninum í Brekkutúni og Hoyvíksgarði og Símun V. Arge, fornfrøðingur, stóð fyri vitjanini í Kirkjubø. Annika L. Black er útbúgvingarleiðari í ferðavinnuni og hevur ábyrgd av útbúgvingini.



*Jan Sørensen, savnsvørður, vísir runt í hølunum í Kaldbak*

# LANDSSTÝRISMAÐURIN Á VITJAN

Mánadagin 7. desembur var Jenis av Rana, landsstýrismaður, á vitjan á Tjóðsavninum saman við aðalstjóranum í UMMR, Poul Geert Hansen og fulltrúanum Armgarð Weihe

**Endamálið við vitjanini** var at geva landsstýrismanninum høvi at hitta starvsfólk og at vísa honum umstøðurnar á savninum. Byrjað var við stuttum fundi í stovuni í Hoyvíksgarði. Har var prátað um ymisk viðurskifti á savnsøkinum. Serliga var prátað um avbjóðingarnar, savnið hevur í sambandi við hølisviðurskiftini. Starvsfólk savnsins eru í løtuni spjadd kring Suðurstreym. Flestu starvsfólkini arbeiða í Kúrdali, men eisini eru fleiri ið arbeiða í Kaldbak og á Debesartrøð.

Ynski er at fáa øll at starvast saman í Kúrdali. Á fundinum fekk stjórin á Tjóðsavninum, Herleif Hammer, høvi at vísa fólkunum frá UMMR eitt uppskot um, hvussu fjósið kundi umbyggjast til skrivstovur, kantinu, fundarrúm og verkstovu. Fjósið er í løtuni goymsla.

Eftir fundin varð heilsað uppá fólk í Kúrdali. Síðani varð farið á Debesartrøð, framsýningina í Brekkutúni og til seinast varð vitjað í Kaldbak.



*Landsstýrismaðurin og aðalstjórin í hølunum hjá Tjóðsavninum á Debesartrøð. Agnes-Katharina Kreiling, PhD. greiðir frá arbeiði sínum*



# Tjóðsavnið var við á Jobmatch 2020




*Jobmatch var hesaferð á netinum*

## HVAT ER JOBMATCH?

**Jobmatch er ein** starvsstevna, ið bleiv ment fyri at skapa og viðlíkahalda sambond millum føroyska arbeiðsmarknaðin og lesandi, nýútbúgvin og útisetar. Harumframt er Jobmatch eisini fyri tey, ið ynskja aðrar avbjóðingar og møguleikar á arbeiðsmarknaðinum. Starvsstevnan Jobmatch er við til at tryggja framhaldandi vøkstur og menning av føroyska samfelagnum.

Jobmatch var í Føroyum fyrstu ferð í 2008 og hevur verið eitt afturvendandi tiltak í Norðurlandahúsinum síðani.

## TALGILDUR PALLUR

**Jobmatch Føroyar varð** í ár skipað á øðrvísi hátt enn undanfarnu ár orsakað av støðuni við Covid-19. Vanligu karmarnir í Norðurlandahúsinum vórðu býttir um við




ein talgildan pall, har stovnar og fyritøkur luttóku við talgildum básum.

Í alt 42 fyritøkur, kommunalir og almennir stovnar luttóku og fleir enn 200 "vitjandi" vóru við á Jobmatch 2020. Jobmatch var tann 29. desembur millum kl. 12 – 17.

## JOBPRÁT

**Møguleiki var at** bíleggja tíð til eitt beinleiðis jobprát á netinum við Tjóðsavnið. Jobprátið kundi nýtast til at tosa um starvsmøguleikar, starvsvenjing, og samstarv um skrivligar uppgávur í sambandi við lesnaðin. Møguleiki var fyri at kjatta og hava audio ella video fundir.

## HVÍ LUTTAKA?

**Hóast vit ikki** høvdu nøkur tøk størv at bjóða, var stórur áhugi at hoyra meira um Tjóðsavnið sum arbeiðspláss, og um hvørjar møguleikar Tjóðsavnið hevur.

Endamálið at luttaka var at gera vart við okkum sum arbeiðspláss og granskingarstovn – vísa á Tjóðsavnið sum eitt nútímans og spennandi arbeiðspláss innan lívfrøði, søgu, fornfrøði, byggisið og miðlan. Vónandi verður møguleiki hjá Tjóðsavninum eisini at luttaka í Norðurlandahúsinum á Jobmatch.



Skorið varð ígjøgnum klædning og tekju fyri at koma at glóðunum

# ELDUR Í Á TJÓÐSAVNINUM

Tað loypti ein álvarsligan hvøkk á okkum á Tjóðsavninum og mong onnur, tá eldur kom í ”Løðuna” í Kúrdali



*Í brendu ruskspannini sæst einnýtisgrillin, sum festi í*

**Í góðveðrinum, sum** var hesar dagarnar í apríl, vóru nógv fólk og hugnaðu sær í umhvørvinum við Hoyvíkina. Fleiri nýttu høvið at grilla sær okkurt til matna. Tað er helst í gáloysni at ein einnýtisgrill varð tveitt í ruskílatið uttanfyri Løðuna. Grillin var ikki kølnað og festi tí í ruskílatið, sum síðani festi í húsið. Hóast hetta var eftir arbeiðstíð vóru framvegis nógv fólk í økinum, so eldurin bleiv fráboðaður heilt skjótt. Tíbetur var grannin við hús og kom við eldsløkkjara, so eldurin var avmarkaður. Tá sløkkiliðið kom á staðið, var eldurin kortini farin millum skins og hold og inn undir takið. Sløkkiliðið mátti tí bróta ígjøgnum klædningin og taka takplátur av fyri at koma inn til gløðurnar at sløkkja.

Tíbetur var skaðin ikki stórur, so hvørki lutir ella tilfar, sum Tjóðsavnið goymir, fekk skaða. Løðan, sum eldur var í, er samanbygd við fjósið. Í fjósinum er smágoymsla Tjóðsavnsins, sum inniheldur m.a. alla myndagoymsluna við yvir 400.000 myndum og alla klædnagoymsluna við forkunnugum klæðum. Var hetta farið fyri skeytið, var tað ein ólukka fyri mentanarsøgu okkara. Fjósið er sum vera man ikki bygt at vera goymsla. Trygdin er tískil hareftir. Eftir hvøkkin av eldsbrunanum var avgjørt at seta eina ABA-eldávaringarskipan upp í bygningunum í Kúrdali. Hetta ger ikki bygningin tryggari, men ger, at boð um eldsbruna, kunnu koma til sløkkiliðið væl skjótari enn nú.



# HOYVÍKSGARÐUR MÁLAÐUR OG TJØRAÐUR

Hoyvíksgarður er ein av friðaðu ognum Tjóðsavnsins og er í dag framsýning

**Søgn sigur, at** Hoyvíksgarður upprunaliga stóð í Kúrdali, men var í 1722 fluttur oman har, hann stendur í dag. Til Hoyvíksgarð hoyra nógv hús; sethúsini, sum eru samanbygd við haldhúsini, 12 úthús, sum m.a. eru smiðja, mylla, neyst, fjós og hoyggjhús. Eisini eru toftir av øðrum úthúsum, t.d. sornhúsinum.

Hóast húsini í dag ikki verða brúktir til teirra upprunaliga endamál, so er kortini nógv viðlíkahald av slíkum bygningum. Í 2020 vóru øll húsini tjørað og málað. Klædningur, vindskeiðir og torvhald vóru tjørað við trætjøru, meðan vindeygu og úthurðar vóru málað við linoljumáling.

Trætjøra og linoljumáling eru trupul evni at arbeiða við. Trætjøra er framleidd úr furutræi og er sera tjúkk og skal tí hitast, so lættari er at smyrja. Hetta arbeiðið svansar illa, og ansast skal eftir ikki at smyrja ov tjúkt, tí so rennur tjøran.



*Magnus Smith stóð fyri arbeiðinum. Hann hevur drúgvar royndir við tjøru- og linoljumáling*

Linoljumáling er eisini ein náttúruúrdráttur. Linolja verður vunnin burturúr línfræi og var linolja høvuðsinnihaldið í málingarúrdráttum heilt fram til 1950árini, tá aðrar oljur og evni vunnu fram. Linoljumáling, ið verður nýtt til okkara endamál, er ikki heilsuskaðilig og er sera góð fyri viðin. Tað krevur venjing og tol at mála við linoljumáling, tí málingin skal smyrjast sera tunt, og tí skulu fleiri løg málast, fyri at málingin skal dekka.



*Útsýnið yvir Hoyvíksgarð ein summardag*



# VERKÆTLANIN AT VARÐVEITA HVALASTØÐINA VIÐ ÁIR

**Tað vóru fleiri arbeiði, sum fóru fram á hvalastøðini í fjør. Við einari játtan á kr. 2 mió., varð rúm fyri at raðfesta annað enn timburarbeiðið, sum øll árini er tikið fram um onnur arbeiði. Verkætlanin skuldi tryggja hús og bygningar, og her er komið á mál við teimum húsum, har vit eru sloppin til**

Erland V. Joensen, savnsvørður

## KAMINURNAR Í KETILSHÚSINUM

**Tað hevur leingi** ligið á láni at fáa múrarar til hvalastøðina. Nú eydnaðist tað. Ketilshúsið, ella Fýrhúsið, er sjáldsamt hús í Føroyum. Tað er laðað við múrsteinum, og er eitt av teimum upprunaligu húsunum á støðini, helst frá 1905. Inni sum úti hevur hetta húsið verið í vánaligum standi, og bjølgur er í niðaru síðu. Uppaftur verri var við tveimum kaminum. Har skuldi eitt veruligt restaureringsarbeiði fáast frá hondini. Múrsteinar lógu inni í Ketilshúsinum, teir lógu uttan fyri, og kaminurnar høvdu eina bøtandi hond fyri neyðini.

Tí vórðu teir leysu múrsteinarnir loystir, reinsaðir við brekkara og vøkstur tikin burtur. Síðan vórðu kaminurnar laðaðar upp aftur av nýggjum, og múrsteinarnir vórðu brúktir aftur. Fimm ymisk sløg av múrsteinum lógu hurl um burl á støðini. Teir vórðu skildir sundur, eisini teir, sum lógu inni í rúmunum, har dampketlarnir hava staðið.

Tað er eisini ætlanin at fara inn í



*Eldri mynd av hvalastøðini. Høgrumegin sæst Ketilshúsið við upprunaligu kaminunum og skorsteinunum. (Snr. 8272F249)*

Ketilshúsið. Sum nevnt er húsið millum tey elstu á støðini, og tað hevur fleiri løg og spor av ídnaðarsøgu. Uttan er Ketilshúsið næstan upprunaligt, men varð eina ferð víðkað í ovara borði og lyft upp, og er tí nakað broytt. Í Ketilshúsinum varð orkan framleidd til alla støðina. Fram til uml. 1945 varð kynt við koli. Upprunaliga stóðu tríggir liggjandi dampketlar í húsinum.

Tað fer valla at síggjast roykur aftur á hvalastøðini, men skorsteinar, ketlar og spøl eru frá einari farnari ídnaðartíð. Hetta er søgan á støðini. Tí varð farið undir at fáa kaminurnar í upprunaligan stand aftur. Eitt ídnaðarvirki, sum er eitt vitni um ein búskaparligan veruleika og eitt virki, sum er hildið uppat at virka og sum avgerð er tikin um at varðveita, er ein ídnaðararvur.

Múrarameistararnir J. & B. Kyster hava staðið fyri arbeiðinum at fáa kaminurnar aftur til heiðurs sum eitt fínt ídnaðarmerki.



*Ketilshúsið í 1979. Tá var tað longu fallið í órøkt, skorsteinarnir somuleiðis. (Snr. 8887F043)*



*Teir taka kaminurnar niður, stein fyri stein, til komið er niður á fast*



*... og múrsteinar verða reinsaðir*



*Úrslitið av tí putluta arbeiðinum hjá múrarunum*

## EPOXY ER IKKI GAMALT Á STØÐINI

*Kvernan* er eitt yngri hús. Í tíðini eftir uml. 1945 var bygningurin, sum var úr timbri og hevði spikkókarar, tikin niður og stoyptur upp aftur. Her inni standa tvær kvernur, kókarar. Uppi á dekkinum, á *Kvernuloftinum* varð hvalur háløður niðan brekkuna við spølum, sum standa á dekkinum, og sagaður sundur í smærri stykki, ið fóru niður í holini í dekkinum og í kvernurnar í neðra.



*Tá ið arbeitt varð á Kvernuloftinum*
*(Snr. 9719F165)*



*Eitt skýli varð riggað til, soleiðis at tað var turt at leggja epoxy á*

Øll árini er væta runnin inn í Kvernuna, og dekkið úr timbri, sum einaferð var á Kvernuloftinum, varð lagt á aftur. Fyri at fáa dekkið tætt, varð betongið slípað og reinsað, áðrenn lag av epoxy varð lagt á.

Fyritøkan AND v/Anfinn Nyholm Debess stóð fyri arbeiðinum at leggja epoxy á.

## TIMBURARBEIÐINI

**Hóast timburarbeiðið higartil** hevur verið tað, sum skuldi til fyri at tryggja hús og bygningar á støðini, og onnur arbeiði hava noyðst at bíða, vóru timburmenn aftur á støðini í 2020. Teir løgdu áðurnevnda timburdekkið á Kvernuloftið. Hetta var eitt stórarbeiði.

Fyrr var nógv lív í á Kvernuloftinum, tí har liðaðu teir sundur og sagaðu hvalirnar. Har stóðu tvær beinsagir, sum vóru brúktar til at saga hval í smærri stykki. Spølini standa enn, og sagirnar skulu setast upp aftur.

Kvernuloftið er ein pallur, har leikararnir eru farnir til hús, meðan útgerðin stendur eftir.

Timburmenninir settu eisini upp húsið, sum stendur millum Perluna og



*Betong – slípað og reinsað*

Kemis. Vit vita lítið um húsið, sum nú er endurreist annað enn, at tað var ein partur av framleiðsluni á støðini, og seinni løgu harpunir hjá hvalabátunum á goymslu í hesum húsi. Fyrst í 1980 árunum, tá ið savnsfólk skrásettu hvalastøðina, huku húsini enn uppi, men vórðu tey seinni niðurtikin. Síðani hevur staðið gapandi tómt millum Perluna og Kemis.

Nú er húsið aftur har og skal brúkast til at sýna fram harpunir og annað frá hvalabátunum.

Aðrar smærri uppgávur vóru eisini gjørdar – hurðar, máling og smærri umvælingar. Tað vóru timburmeistararnir Høgni Djurhuus og André Jacobsen, sum stílaðu fyri í fjør.



*Hús til aðru beinsagina er reist aftur*





*Timbur kom á Kvernuloftið*



*Millum Perluna og Kemis í 1983*





Millum Perluna og Kemis (mynd th.: André Jacobsen)




Sunnanfyri hvalastøðina er pláss fyri fjølbroyttum savnsvirksemi

## NÝGGJ GØTA FRÁ EBENEZER TIL GRÍSA-HÚSIÐ, LABORATORIIÐ OG TIL PERLUNA

**Tá ið hvalastøðin** skal sýnast fram, er neyðugt at hava góðar gøtur í lendinum. Tí fór nógvur grevstur fram millum húsini. Endamálið er, at tey vitjandi kunnu ganga meira frítt og síggja støðina betur. Men gøtan hevur eisini eitt annað endamál. Rør vórðu løgd í gøtuna, tí hvalastøðin hevur næstan onki vatn havt. Á fyrsta sinni síðan verkætlanin fór í gongd, bar til at raðfesta elinnlegging á støðini, kaðal til net og somuleiðis káplar til eina eldávaringarskipan, sonevnda ABA.

Arbeiðið at veita og binda í talvur heldur fram í 2021. El- og ávaringarskipanin eru umfatandi íløgur. Øll hús og allir bygningar skulu hava ljós, sum við tíðini verður bygt út. Tað skal vera ljós á hvalastøðini. Tað skal lýsa í myrkri millum áirnar við Áir.

Ingi Zachariasen Spf. stendur fyri grevstrinum, og El.fo Spf. fyri el- og ávaringarskipanini.

Verkætlanin at varðveita hvalastøðina við Áir er ein restaureringsverkætlan. Aðalmálið er at fáa hvalastøðina aftur til árið 1958, tá ið hon fór í gjaldsteðg. Í 1960- og 70árunum var hvalastøðin virkin, men tað vóru eisini ár, har hon lá still og óvirkin. Tí fóru ongar stórvegis broytingar fram á støðini, men heldur gekk aftur á hond, og støðin fall í órøkt. Tí leggur verkætlanin seg eftir, hvussu hvalastøðin sá út í 1958. Í summum førum verða burturblivnar luteindir førdar aftur



Rør eru løgd og káplar drignir eftir gøtuni

til 1958, men í flestu førum verður gjørt sum minst. Tó er neyðugt at varðveita trúvirðið og fáa fatur á heildini, sum var á hvalastøðini.

Verkætlanin at varðveita hvalastøðina fylgir 'Ávegis álit um varðveiting av hvalastøðini sum sjóvinnusavn' (Mentamálaráðið 2007). Í tí seinna, 'Hvalastøðin við Áir. Álit um økisskipan' (Mentamálaráðið 2013), varð eisini hugsað um økið sunnanfyri hvalastøðina hjá Sunda kommunu. Her eru góðir møguleikar fyri savnsvirksemi, sum hevur við havið og sjógvin at gera. Tí varð eisini arbeitt við at orða og myndsýna eitt savnsvirksemi við fiskivinnu, livandi savni, sjóvinnu, bátasavni og havbúnaði.

Eitt maritimt savn hevur samfelagsligan týdning, og høvuðsvinnurnar í Føroyum hava við sjógvin at gera. Eitt maritimt savn kann styrkja søguliga medvitið og geva innlit í føroysku samfelagsgongdina seinastu hálvaaðru øldina. Havið og føroyski samleikin er eitt greipað heild. Aðrastaðni eru søvn í enn størri mun enn fyrr vorðin ein størri partur av tí mentanarliga, sosiala og fíggjarliga kervinum í samtíðarsamfelagnum.

Sjó- og fiskivinnusøga er um lívið hjá menniskjum, sum liva við havið. Tað er um tilfeingi, troytt úr sjónum, fiskiveiðu og fiskiídnað, búskaparligt og sosialt lív, um tilveruna í nærumhvørvinum, um flutning av fólki og farmi sjóvegis, samskifti og samferðslu innanhýsis og við umheimin, sjóhandil, skip, siglingarfrøði, sjófólk og reiðarar, fyritøkur, stovnar og tøkni.

Tað ber til at siga, at Føroyar sum fiskivinnusamfelag og siglingartjóð seinastu 150 árini hava verið ávegis eini alheimsgerð, áðrenn vit fóru at tosa um hugtakið globalisering. Vørur og framleiðslur, kunning, tankar og hugmyndir hava áhaldandi skift millum land og útland. Felagsnevnarin er savn, sjógvur og samfelag, og framhald av álitinum frá 2013. Hetta arbeiðið hevur heitið 'Havsins søgur. Savnsvirksemi við Áir', og heldur í samstarvi við arkitektastovuna Kontrast fram í 2021.

Arkitekturin Mayfinn Norðoy á Kontrast hevur byggileiðsluna av hvalastøðini um hendur. Verkætlanin at varðveita hvalastøðina, sum hevur vart árini 2011 til ársenda 2020, hevur kostað kr. 16,3 mió.




Soleiðis kann økið síggja út í framtíðini við fleiri savnspørtum

# FORNFRØÐILIGIR ÚTGREVSTRAR Í 2020



*Øttisheyggur á Giljanesi*





*Dronumynd av útgrevstrinum niðri á Bakka*

Helgi D. Michelsen, savnsvørður

## SPENNANDI TÍÐARFESTING NIÐRI Á BAKKA Á VELBASTAÐ

**Frá 15. juni** til 17. juli í 2020 framdi Tjóðsavnið fornfrøðiligan útgrevstur niðri á Bakka á Velbastað. Staðurin, har útgrevsturin var, verður eisini nevndur Kirkjugarðsbakki. Her er fornur ringleiddur kirkjugarður, har fornfrøðingar hava funnið kristnar gravir, og í miðjum kirkjugarði er lítil kirkju- ella bønhústoft grivin fram.

Undir hesi kirkjutoft eru grundarsteinar av eldri kirkju. Í moldini undir grundarsteinunum á eldri kirkjuni eru brend byggkorn funnin. Í mai 2020 vórðu hesi byggkorn tíðarfest til millum ár 765 og 905. Ein sjáldsamur enskur silvurmyntur, ið er tíðarfestur at stava frá 910-915, og sum var funnin við eina grøv í kirkjugarðinum í 2016, bendir á, at kirkjustaðurin er gamal. Nýggju tíðarfestingarnar stuðla undir hesa fatan og staðfesta, at fólk hava búleikast niðri á Bakka longu tíðliga í víkingaøld. Í miðøld fluttu tey longur niðan, har bygdin nú er. Brimið hevur máað tað mesta av elstu búsetingini burtur. Í bakkanum síggjast nú bert leivdir eftir búseting, eitt nú øska og brent malargrót.

Nýggju tíðarfestingarnar kunnu benda á, at kristna trúgvin á Velbastað er væl eldri enn uml. ár 999, tá ið Sigmundur sigst hava kristnað Føroyar. Hetta ger fornfrøðiliga útgrevsturin á Velbastað forkunnugan og sera týdningarmiklan fyri okkara fatan av, nær og hvussu Føroyar vórðu kristnaðar. Tjóðsavnið gjørdi tíðarfestingarnar í samstarvi við Moesgaard museum í Aarhus og A. Mickiewicz University í Poznan í Pólandi.

Í 2020 varð gólvið í kirkjutoftini, ið var steinsett við fløtum malarsteinum, tikið burtur. Undir hesum gólvi var sandmold, og undir sandmoldini var eldri vakurt gólv reinsað fram; hetta var sett við smáum malarsteinum og størri fløtum steinum, ið vóru lagdir í røðir. Norðanfyri kirkjutoftina vórðu tvær gravir staðfestar og grivnar út, men eins og við grøvunum, ið higartil eru grivnar út, vóru bert leivdir av tonnunum varðveittar.

Eitt annað fokusøki fyri útgrevsturin í 2020 var at víðka grevstrarfeltið vestureftir fyri at avdúka sjálvan kirkjugarðsbygnaðin. Hetta var gjørt fyri at finna útav, hvussu og nær kirkjugarðurin varð bygdur. Staðfest varð, at kirkjugarðurin varð bygdur av gróti og flagi. Serliga niðastu steinarnir vóru stórir og ikki mannbærir. Moldroyndir vórðu tiknar av eini moldflá við kolaðum leivdum, ið lá niðast upp móti stóru steinunum. Brend byggkorn frá hesi moldflánni verða tíðarfest í 2021 og koma vónandi at siga nakað um, nær kirkjugarðurin varð bygdur.



*Útgrevstur niðri á Bakka*

Ein týðandi liður í granskingarverkætlanini á Velbastað er eisini at menna fornfrøðiligu tøknina. Mentanarlandsløgini kring toftirnar eru skrásett í 3D við dronu, og lendið er skannað við georadara ella GPR (Ground Penetrating Radara). GPR er eitt tól, ið gevur myndir av avvikum, sum t.d. toftir o.ø., ið brýtur frá natúrliga lendinum. Í 2020 varð eisini arbeitt við at tulka GPR dátur úr økinum vestanfyri kirkjustaðin, har tað sigst, at gomul búseting skal hava verið. Fleiri kanningar í økinum mugu til, áðrenn hetta kann staðfestast.

Umframt føstu starvsfólkini á fornfrøðideildini, luttóku Andras á Lofti, BA í fornfrøði, Rannvá Næs Hoydal, BA í fornfrøði og Petur Hansen, MA í fornfrøði í fornfrøðiliga feltarbeiðinum í 2020. Andras á Lofti hevur harumframt arbeitt við viðgerð av GPR dátum og Petur Hansen hevur sáldað og viðgjørt moldroyndir.



*Fólk frá Tjóðsavninum staðseta bakkaverjuna á Sondum*

## FORNFRØÐILIG FORKANNING Í GERÐABØ

**Fornfrøðiliga forkanningin, ið** Tjóðsavnið gjørdi í mai 2020 í Gerðabø í Klaksvík, varð umbiðin av Landsverki í sambandi við ætlaðar tunlar norður um Fjall. Eitt av uppskotunum hjá Landsverki var ein linjuføring, ið innibar tunnilsmunna, veg og rundkoyring í Gerðabø í Klaksvík.

Gerðabøur er ríkt mentanarlandslag við týðandi jarðføstum fornminnum. Við ætlaðu rundkoyringina er staðurin uppi á Grundum, har týðiligar húsatoftir síggjast í lendinum. Her er eisini minnisvarði reistur yvir tey 25 fólkini, ið umkomust í skalvalopunum í 1745 og 1765. Eftir skalvalopið í 1765 fluttu tey, ið yvirlivdu, longur oman í bøin, har Gerðagarður nú er. Fornfrøðiliga forkanningin var sett í verk fyri at fáa eina betri fatan av, hvussu víða og djúpt fornleivdirnar liggja í Gerðabø.

Fornfrøðiliga forkanningin staðfesti vavið á fornminnunum uppi á Grundum og vitan um fornminnini varð fingin til vega, ið gevur eina betri fatan av toftunum og upprunaliga mentanarlandslagnum í Gerðabø. Lendisskrásetingar við dronu og GIS-greiningarnar fingu sporini frá farnum tíðum at traðka fram í lendið, og tey síggjast í øllum sínum fjølbroytni um allan Gerðabø. Við GIS-greiningum er gjørligt at staðseta og skráseta sjónligu fornleivdirnar uppi á Grundum heilt neyvt. Umframt húsatoftir eru forn teigalendi, garðløg, gøta og geil vorðin so týðilig, at tey kundu teknast og staðsetast á Føroyakortið í GIS. Skrásetingin skapti neyvt grundarlag fyri avmarkingini av fornminnaøkinum uppi á Grundum, sum hon er víst á mynd 2 í hesi frágreiðing. Fornfrøðiligu kjarnuboringarnar vístu, at kulturflákrnar uppi á Grundum eru tjúkkar í støðum, og at eldri toftir finnast í lendinum undir teimum sjónligu. Sostatt hava fólk helst búleikast uppi á Grundum í øldir. Ein møguligur fornfrøðiligur útgrevstur uppi á Grundum verður sostatt umfatandi, og mett verður, at tað kann taka millum 3 og 5 ár at grava økið út.

## SÓLSKINSSØGA Á SONDUM Í SANDAVÁGI

**Í juli 2020** kom ein fráboðan til Tjóðsavnið um at steinsetingar vóru komnar undan kavi í einum bilhúsi á Sondum í Sandavági. Steinsetingarnar komu undan kavi, tá eigararnir vóru farnir undir at lækka gólvstøðið í bilhúsinum. Eigararnir vóru sera áhugaðir í, hvat hesar steinsetingar kundu vera, tí har á leið stóðu einaferð húsini Haraldstova, har Beinta (1668-1752) og Peder Arrheboe prestur búðu, eftir at hann hevði fingið dóm og mist kjólan, og tey vóru tvungin at flyta úr Miðvági og prestagarðinum í Jansagerði.

Fornfrøðiligur útgrevstur var gjørdur í bilhúsinum. Undir útgrevstrinum kom undan ein vøkur steinsett renna, partvíst lokað við viði, ein steinsett gøta, grundarsteinar av einum hjalli og av einum øðrum húsum, har mørtil var millum steinarnar. Harumframt kom ein steinsettur køstur undan kavi. Allar hesar leivdir vóru bara partvíst sjónligar, tí tær gingu út undir veggirnar á bilhúsinum. Lutirnir, ið komu fram í útgrevstrinum, so sum kritpípur, tallerkar og íløt kundu tíðarfestast aftur til uml. 1850. Mett var tó ikki, at tað var ráðiligt at fara longur niður, enn eigarin hevði brúk fyri at fara, men heldur at skráseta leivdirnar, dekka tær til aftur og goyma tær til komandi ættarlið og soleiðis hava møguleikan fyri at kanna fornleivdirnar í einum størri samanhangi.

Tað er eingin loyna, at fólk kunnu halda seg aftur við at boða Tjóðsavninum frá, um tey koma fram á okkurt, tá tey grava á sínari ogn, tí tey óttast fyri at fornfrøðingar kunnu seinka ella steðga teirra arbeiði og bygging. Tjóðsavnið hevur seinastu árini ment tøkni, ið ger tað munandi skjótari at gera fornfrøðiligar kanningar og útgrevstrar. Útgrevsturin í bilhúsinum á Sondum í Sandavági var ein sólskinssøga í so máta. Eigararnir vóru umhugsnir og boðaðu frá, og Tjóðsavnið gjørdi útgrevsturin í bilhúsinum skjótt og gott, so eigarin slapp undan grevstrararbeiðinum og kundi halda fram við at gera nýtt gólv í bilhúsinum á heysti sama ár, sum fráboðanin til Tjóðsavnið kom.

## AÐRAR RANNSÓKNIR

**Fornfrøðiligar forkanningar, lendisskrásetingar** og georadarkanningar vórðu eisini gjørdar í sambandi við verkætlanir kring landið; við Íslistoft í Hvannasundi í sambandi við útstykking har, undir Gøtueiði í sambandi við nýtt havnarlag, í Glyvradali í sambandi við útbygging av alistøð, í Kirkjubø í sambandi við ætlanir um útbygging og í sambandi við eina gøtuætlan, við Øttisheyg á Giljanesi í sambandi við matrikulering, í Tjørnuvík í sambandi við víðkan av parkeringsøki, við Prestá á Skála í sambandi við fríøki, umframt at krígsminnini við Kongaminni í Tórshavn og kirkjutoftin "Líkhús" í Kirkjubø vórðu skrásett í 3D í sambandi við umsjón og varðveitingararbeiði. Haraumframt var fornfrøðiligt eftirlit við grevstrararbeiðum í Gerðismørk í Leirvík í sambandi við el-leiðingar og við Nóloyarpálsstovu í Tórshavn í sambandi við útbygging og umvæling.

Arbeiðið at skráseta og kortleggja krígsminni frá seinna heimsbardaga helt áfram í 2020. Í hesum sambandi var Jón S. Hansen, søgufrøðingur, settur at skráseta krígsminni í Tvøroyrar kommunu og at gera skrásetingina av krígsminnum í Vága kommunu lidna. Fyri hesar báðar kommunur framleiddi Tjóðsavnið webkortløg við krígsminnum, so tey kunnu leggjast út á kortalar og nýtast í umsiting og miðlan.

*Fornleivdir í bilhúsi á Sondum í Sandavági 2020*





*Varðveitingararbeiðið við toftina Líkhús*

## BAKKAVERJUR OG VARÐVEITINGARARBEIÐI Í 2020

# BAKKAVERJUR AT VERJA FORNMINNINI

**Í 2020 gjørdu Tjóðsavnið og Landsverk forkanningar, projektering og umvælingar av bakkaverjunum, ið verja fornminnini í Kirkjubø og á Sondum á Sandi**

Helgi D. Michelsen, savnsvørður

**Bakkaverjan undir Ólavskirkjuni,** ið grótsmiðurin av Argjum, Niels Lassen Arge, gjørdi í 1870, og verndargarðurin undir kirkjutoftini Líkhúsi, ið Jóannes Patursson, bóndi, gjørdi í 1945, hava hildið væl, men nú var tørvur á umfatandi umvælingum á gomlu bakkaverjurnar. Í 2020 bleiv ein fótur stoyptur undir verndargarðin undir kirkjutoftini Líkhús. Múraravirkið Krossteig og Articon gjørdu arbeiðið. Ætlanin var eisini at umvæla verjugarðin undir Ólavskirkjuni í 2020, men hetta arbeiðið varð útsett til 2021.

### ELSTA BÚSETING Í FØROYUM

**Á Sondum á** Sandi hava fornfrøðiligar kanningar víst á leivdir eftir elstu búseting, ið vit vita um í Føroyum. Tjóðsavnið tók stig til og gjørdi fyribils bakkaverjur, eftir at kanningar vóru gjørdar av bakkanum í 1996 og aftur í 2008. Men hesar eru við árunum máaðar burtur, og í 2020 gjørdist bráðneyðugt at umvæla bakkaverjuna eftir nógva uppgangin fyrst á árinum. Gróthúsið, ið stendur dygst á bakkanum, stóð til at fara í havið, og tí gjørdist alneyðugt við einari nýggjari fyribils bakkaverju. Ein avtala varð gjørd við Sands kommunu um at fáa burtur av grótgoymsluni oman fyri havnarlagið. Ein fipurtexdúkur og plattar vórðu lagdir innast at verja fornminnini, og síðani varð grót lagað upp ímóti bakkanum, har gróthúsið stendur. Arbeiðið við bakkaverjunum heldur fram í 2021.



*Fótur, stoyptur undir gomlu bakkaverjuna frá 1942 undir Líkhúsi í Kirkjubø*

### VARÐVEITINGARARBEIÐINI VIÐ FORNMINNUNUM Í KIRKJUBØ

**Varðveitingararbeiðini við Kirkjubømúrin** hildu fram í 2020. Serliga varð arbeitt kring durðin á suðursíðini, har durðurin varð reinsaður og konserveraður. Hartil varð eitt dren lagt fram við vegginum, fyri at væta ikki skal seyra inn í Múrin. Einar 100 m eystur frá Múrinum á Líkhúsfløtti síggjast leivdirnar eftir lítlari kirkjutoft, ið vanliga verður nevnd Líkhús. Helst er hetta kirkjan, sum Johannes Theutonicus, biskupur árini 1408-30, umrøddi, tá hann í 1420 skrivar um kirkju, sum tá er í gerð og skal vígast Sankta Brandani. Víkin út fyri Líkhúsfløtt nevnist Brandansvík. Fornfrøðilig rannsókn í 1954 staðfesti, at lík liggja grivin í kirkjugarðinum bæði norðan- og vestanfyri kirkjutoftina eins og inni í toftini. Heitið Líkhús er uttan iva nógv yngri – kanska íkomið, tí mannabein av og á vóru at síggja í beninum oman móti fjøruni. Eyðvitað er toftin nógv merkt av brimi, sum hevur tikið stóran part av kirkjutoftini í havið. Verjugarðurin, laðaður í 1942, hevur bjargað tí, ið eftir er av kirkjutoftini. Í 2016 varð ein veðurverja sett upp fyri at turka múrverkið, áðrenn sjálv konserveringin av múrverkinum kundi gerast. Í 2020 var tað síðsta av veðurverjuni tikið niður og Hans Chr. Frederiksen, konservator, var í Føroyum í mai mánað og umvældi múrverkið. Hetta arbeiðið verður eftir ætlan gjørt liðugt í mai 2021.





*Fyribils bakkaverja verður gjørd á Sondum á Sandi*

### BIRGIR KROSSTEIG, MÚRARI, FARIN

**Birgir Krossteig, múrari,** hevur seinastu mongu árini hegnisliga staðið fyri arbeiðinum at viðlíkahalda múrverkið í fornminnunum og bakkaverjunum í Kirkjubø. Varðveitingararbeiðini krevja handaligt hegni og ekspertisu innan konservering, har m.a. mørtilsamanseting og laðing skal vera lík teirri upprunaligu. Tjóðsavnið hevur seinnu mongu árini samstarvað við Hans Chr. Fredeiksen, konservator, ið hevur lagt lag á innan varðveitingararbeiði, meðan Birgir Krossteig og hansara fólk hava gjørt arbeiðið.



*Birgir Krossteig, sáli, og Hans Christian Frederiksen, konservator, tingast um loysnir*

Tjóðsavnið hevur havt stórt gagn av fakliga dugnaseminum og góða samstarvinum við Birgir Krossteig.

Birgir Krossteig doyði brádliga á heysti 2020.

# Hvussu hevur korona ávirkað viðurskiftini í Koltri?

Sum øll onnur í landinum lurtaðu vit í Koltri eftir løgmanni, sum í Útvarpi Føroya hósmorgunin 12. mars hevði boðað til tíðindafundar. Tað fyrsta sum hendi var, at okkara einasta samband við meginlandið, tyrlan, avmarkaði rutuflúgvingina til einans at røkja sambandið til tær smærru oyggjarnar, sum einki annað samband hava

Bjørn Patursson, oyggjarvørður

**Spurningurin um, hvat** hevði hent, um smittan varð borin út í eina so lítla oyggj sum Koltur, fylti nógv og ger tað framvegis. Men tíbetur er ikki so nógv ferðsla í oynna vetrartíðina og so tíðliga á ári, og tað gjørdi, at vit fingu tíð at umhugsa støðuna og taka neyðug stig.






## VÁRFJALLIÐ AVLÝST

**Tann fyrsta avmarkingin** var, at vit avgjørdu at avlýsa várfjallið. Vit mettu ikki, at tað fór at merkja seyðahaldið nakað nevnivert, men kanska var hetta tó orsøkin til, at vit á heysti 2020 máttu staðfesta størri felli enn vanligt millum áseyðin og samsvarandi lágt lambatal.

## STEÐGAÐU VIÐ HEIMABLÍDNI

**Síðani Koltursgarður varð** niðurlagdur 31. desembur 2014 til frama fyri, at oyggin Koltur varð flutt til mentamál, og harvið gjørdist ein partur av Tjóðsavninum, hevur oyggjarvørðurin sambært avtalu við Tjóðsavnið rikið ferðavinnu umframt at virka sum oyggjarvørður. Í tí sambandi hevur Koltur Sp/f skipað fyri, at vitjandi, sum ynskja tað, fáa serstakar upplivingar, eitt nú rundvísingar í bygdalagnum við søgu og frásøgn eins og at bjóðað hevur verið inn á gólvið til heimablídni.

Men sum umstøðurnar eru, eitt nú at heimablídni er í embætishúsunum

Norðuri í Gerði, har oyggjarvørðurin heldur til, og sum eisini er einasti bústaður í oynni, valdu vit í samráð við Pál Weihe at steðga við heimablídni, men at halda fram við rundvísingini. Pál Weihe legði dent á, at útilívið avgjørt ikki skuldi avmarkast, men at mann heldur átti at finna nýggjar møguleikar á tí økinum.















## FÆRRI VITJANDI Í 2020

**Vit skráseta ikki,** hvussu mong vitja Tjóðsavnið í Koltri. Men tó, eingin ivi er um, at munandi færri vitjandi vóru í 2020 í mun til árini frammanundan. Í 2015, 2016 og 2017 gjørdu vit eina kanning av vitjandi, sum vísti, at áleið 1.500 fólk vitja á savninum, harav knapt 80% eru føroyingar.

## BETRA UM UMSTØÐURNAR HJÁ VITJANDI

**Einki er so** ringt, at tað ikki er gott fyri okkurt. Sambært heilsufrøðini hava vit í Føroyum lurtað væl eftir tilmælum um at fyribyrgja smittu millum fólk, og tað hava vit í Koltri so eisini gjørt. Millum annað eru vesirúmini útgjørd við neyvari reingerð og útgerð til vitjandi soleiðis, at reinførið kann vera so gott sum til ber á savninum. Eisini hava vit sett upplýsandi uppsløg upp, sum vísa til almennu tilmælini.

## OYGGJADAGUR 2020 BLEIV TIL "KOLTURSDAG"

**Seinastu árini hevur** Tórshavnar Kommuna skipað fyri oyggjadegi. Talan hevur verið um ein felags dag, har borgarar og vitjandi fáa serstakt høvi at vitja oyggjarnar í Tórshavnar Kommunu, Nólsoy, Hest og Koltur.

Visit Tórshavn skipaði so fyri, at rutusambandið hendan dagin var lagt til rættis í samráð við fyriskiparanar, sum so bjóða teimum vitjandi serstakar túrar og upplýsingar á ymisku oyggjunum. Seinastu árini hevur hesin leygardagur verið miðskeiðis í juni, og hevur hann verið sera væl vitjaður og umtóktur.



Í fjør, tá ið korona herjaði, tóku Nólsoy og Hestur seg burtur úr, og dagurin bleiv tí munandi skerdur. Í tøttum samstarvi við Pál Weihe bleiv avtalað at fyriskipa 9 túrar fyri 25 fólk, sum kundu vitja Koltur hendan dagin. Sambært Visit Tórshavn stóð ikki á at selja atgongumerkini.

## VAKSANDI ÁHUGI AT FERÐAST Í EGNUM LANDI

**Nú koppsetingin er** byrjað og tamarhald sýnist at vera á koronu, tykist tað sum, at áhugin fyri at ferðast í egnum landi er vaksandi. Bíleggingar eru longu komnar í kalendaran og í skrivandi løtu er Visit Tórshavn í holt við at leggja oyggjadagin í summar til rættis.

## MENTANARTILTØK OG MENTANARLANDSLØG

**Tað tykist sum** áhugin fyri mentan, mentanarlandslagi og fyribrigdum á tí økinum er vaksandi millum ungdómin. Vit á Tjóðsavninum í Koltri hava sett slík tiltøk á skrá komandi summar, tó enn einans á byrjanarstøði. Áhugi er fyri at halda forna landslagið innangarðs við teigalendi, bøgørðum og úthúsum í hevd. Endamálið er at varðveita, skráseta og læra um, hvussu aldargamla føroyska bóndasamfelagið virkaði og livdi ætt í ætt.

Uttangarðs, á sjógvi og á landi eru somuleiðis mentanarlandsløg og mong fyribrigdi, sum við tíðini fella aftur í forna, um tey ikki verða brúkt og hildin. Hugsanin er at geva ungum fólkum møguleikan at luttaka og læra um gomlu mentanina.

Í fyrstu atløgu er talan um at hava skoraseyð í Ærskor og røkja vallaða bergið vestan til á oynni, har lundi, skrápur og havhestur eigur. Somuleiðis er hugsanin at eggja fólki at vera við til at velta føroyskt korn í reinavelting á teigalendinum.

## ÚTNYRÐINGSSTORMUR KOPPAÐI LÍKHÚSIÐ

**Korona skal tó** ikki hava skyldina fyri, at Líkhúsið fór um koll. Tað var útnyrðingsstormurin, sum herjaði fyrst í februar, sum tók Líkhúsið. Varðahjallurin, vanliga nevndur Líkhúsið, var fyrr brúktur at seta lík í, tá bíðað var eftir farti til Kirkjubøar, har koltursfólk, tá vórðu grivin. Í 1846 valdu koltursfólk tó at byggja egnan kirkjugarð heilt uppi undir Hamarsgarði. Kanska hava tey ikki viljað havt lík standandi í Líkhúsi, meðan bíðað var eftir farti orsakað av smittuvanda. Miðskeiðis í átjanhundraðtalinum herjaðu meslingar í Føroyum. Nú er so farið undir at byggja Líkhúsið uppaftur.



# NÁTTÚRAN Í KOLTRI

## 2020 var annað árið við skipaðum kanningum í Koltri

Leivur Janus Hansen, savnsvørður



*Leirrók er fyri tað mesta góð at ganga eftir, men høgt er niðurfyri*

**Í stuttum er** talan um fyrstu stigini til eina somikið væl kannaða náttúru, at tá kanningar verða gjørdar einaferð í framtíðini, so skal tað bera til at staðfesta, hvørjar broytingar eru farnar fram. Væntandi verða broytingarnar stórar, tí útgangsstøðið er, at innan stutta tíð byrjar ein endurbøting av náttúruni í Koltri. Hetta fer at hava við sær, at seyðurin verður tikin av, og at náttúran aftur verður so upprunalig sum gjørligt.

Í 2020 vóru fallfellur settar niður á fimm støðum. Fýra av teimum í Høvdarhaga og ein í Knøðunum, eitt lundaland vestanfyri. Orsøkin til, at hesi støðini ikki vóru tikin árið fyri, var, at tað er ikki lætt og skjótt at koma til hesi støðini.

Eisini vóru sonevndir rundingar kannaðir á nøkrum støðum, og á fimm støðum vóru sýn tikin av reyðmaðkum.

Tjóðsavnið setti Evu K. Hansen og Steffan Joensen, sum bæði lesa lívfrøði, í starv at arbeiða við at savna inn og flokka tey innsavnaðu dýrini. Seinni var Agnes-Katharina Kreiling, PhD. sett í starv at flokka og eyðmerkja skordýrini. Í 2019 vóru um 5.000 dýr flokkað. Nú eru um 20.000 dýr flokkað, og av teimum eru um 1.000 klukkur eyðmerktar til slag. 100 av hesum klukkunum eru settar á nál og lagdar afturat skordýrasavninum hjá Tjóðsavninum.

Áðrenn farið var undir hesa kanningina vóru 33 sløg av klukkum funnin í Koltri, nú er talið 53.

Hóast tað als ikki er komið á mál enn, so kunnu vit longu nú staðfesta, at ein av klukkunum er av slagnum norðurtøðklukka (Aphodius borealis), og er hetta slagið ikki einans nýtt fyri Koltur, men eisini fyri Føroyar.

*Fallfellur verða settar í Høvdarhaga*









*Vaksnu várflugurnar síggjast flúgva í nánd av áum og vøtnum*

# GRANSKING AV VÁRFLUGUM Í FØROYUM

**Leivur Janus Hansen hevur saman við Gísla Má Gíslasyni útgivið grein um várflugur í Føroyum. Várfluga er føroyska navnið á skordýrahópinum Trichoptera. Hetta eru skordýr sum líkjast firvaldum, men størsti munurin er helst, at ormverurnar hjá várflugum liva í áum og vøtnum**

**Her gera onkrar** ormverur húsa av sandi og smásteinum. Tær kunnu ganga á botninum við hesum eyðkenda húsanum. Aðrar ormverur spinna sær ein nethúsa, sum tær festa á áarbotnin og við hesum netinum fanga tær ymist, sum kemur við áarstreyminum. Somikið væl eta ormverurnar, at vaksna várflugan etur als ikki.

Í greinini er ein søgulig gjøgnumgongd av gransking av várflugum í Føroyum. Við at gjøgnumganga allar skrivligar keldur kunnu høvundarnir staðfesta, at tað eru 20 sløg av várflugum skrásett í Føroyum. Eisini hava teir hugt eftir uppáhaldinum í onkrari av keldunum, at ávís várflugusløg ikki koma fyri í Norðuroyggjum, men teir staðfesta, at hetta einans tykist so, tí tað eru ikki so nógv hóskandi búøki har.

Greinin er at finna her:

Hansen, L. J., & Gíslason, G. M. (2020). Trichoptera in the Faroe Islands. Zoosymposia, 134(18), 127–134.



*Ein nýklakt froðuspretta 'Philaenus spumarius' (Linnaeus, 1758)*





Ein stinkteka *Dolycoris baccarum* (Linnaeus, 1758)

# 6 NÝGGJ SLØG AV SÚGKJAFTUM

**Leivur Janus Hansen hevur saman við Jens-Kjeld Jensen útgivið grein um súgkjaftar í Føroyum. Súgkjaftar er føroyska navnið á skordýrahópinum Hemiptera. Sum navnið bendir á, so er eitt sereyðkenni hjá hesum skordýrum, at tey ikki bíta, men ístaðin stinga við sínum kjaftlimum og súgva sína føði**

**Í greinini verða** 6 nýggj sløg lýst fyri Føroyar, og tað eru nú skrásett 47 sløg av súgkjaftum í Føroyum. Hetta er ein sera fjølbroyttur hópur og fleiri av sløgunum eru heilt vanlig í Føroyum, eitt nú sekkjarskjaldlúsin. Hetta er tann lítla hvíta flykran, sum sæst undir steinum og í mosalendi. Her eru eisini bátsmanstekurnar, sum svimja í hyljum og tjørnum og fentekan, sum knappliga støkkur undan tær, tá tú gongur í einum vátlendi.

Umframt at savna eitt yvirlit yvir øll sløg, ið eru skrásett í Føroyum, so hava teir sett føroysk nøvn á fleiri av sløgunum og ættunum. Súgkjaftar verða bólkaðir í teir fýra undirhóparnar: froðusprettur, plantusprettur, tekur og plantulýs.



*Fentekan 'Salda littoralis' (Linnaeus, 1758)*



*Ein æðrateka 'Corizus hyoscyami' (Linnaeus, 1758)*

Greinin um súgkjaftar er at finna her: Hansen, L. J., & Jensen, J.-K. (2020). Súgkjaftar (Insecta: Hemiptera) í Føroyum / Hemiptera in the Faroe Islands. *Fróðskaparrit - Faroese Scientific Journal*, *65–66*, 1.



*Furutekan 'Leptoglossus occidentalis' (Heidemann, 1910)*



*Sekkjarskjaldlúsin 'Arctorthezia cataphracta' (Morrison, 1952)*



*Ungur smyril sum hevði flogið inn í eitt fjós á Trøllanesi. Hann varð ringmerktur og 4 mánaðir seinni varð hann funnin deyður í Oyndarfirði*

# RINGMERKING Í FØROYUM 2020

**Ikki kann sigast, at føroysku ringmerkjararnir vóru darvaðir av koronu í 2020**

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Væl bar til** at fara út í náttúruna – ja, har var mestsum einki annað at gera – og vanligu værkætlanirnar hildu fram. 494 fuglar og 16 sløg vórðu ringmerkt. Tó merktist á samlaða ringmerkingartalinum, at drunnhvítamerkingin ikki hevur verið líka miðvís sum frammanundan. Tey seinastu nógvu árini hevur talið á ringmerktum drunnhvítum ligið ímillum 1000-7000 fuglar, men í ár vóru bert 283 merktir. Hetta er í stóran mun ein avleiðing av, at núverandi drunnhvítamerkingin er broytt soleiðis, at hvør einstakur fuglur verður vigaður, mátaður og kannaður. Hetta er tíðarkrevjandi arbeiði, og tí kann ringmerkingin ikki ganga skjótari fyri seg.

Um drunnhvítar ikki eru roknaðir við, so var talið á ringmerktum fuglum í 2019 og 2020 tó júst tað sama: 211. Neyva samanfallið er stuttligt, men tað, at tølini vóru lík, er ikki óvæntað, tá hugsað verður um, at ringmerkingarluttøkan var at kalla tann sama bæði árini. Tó vóru heldur fleiri sløg ringmerkt í 2020, harímillum tveir smyrlar á Trøllanesi, sum við fáum døgum ímillum høvdu flogið inn í ávikavist eitt fjós og ein høsnagarð og máttu hjálpast út. Tíverri var annar, sum

| | 2019 | | 2020 | |
|---|---|---|---|---|
| Slag | Ringmerktir | Fráboðaðir | Ringmerktir | Fráboðaðir |
| Drunnhvíti | 1405 | 136 | 283 | 76 |
| Sýldur drunnhvíti | 49 | 16 | 0 | 0 |
| Skrápur | 19 | 0 | 76 | 4 |
| Havhestur | 5 | 1 | 26 | 2 |
| Súla | 0 | 0 | 0 | 2 |
| Kjógvi | 33 | 19 | 46 | 7 |
| Skúgvur | 29 | 2 | 1 | 6 |
| Lundi | 20 | 4 | 14 | 24 |
| Teisti | 0 | 0 | 1 | 1 |
| Lomvigi | 0 | 7 | 0 | 7 |
| Likka | 0 | 3 | 2 | 2 |
| Svartbakur | 2 | 0 | 1 | 0 |
| Rita | 8 | 0 | 7 | 22 |
| Tjaldur | 0 | 1 | 2 | 6 |
| Skarvur | 4 | 1 | 0 | 0 |
| Æða | 3 | 13 | 5 | 6 |
| Grágás | 0 | 1 | 0 | 1 |
| Svanur | 0 | 4 | 0 | 0 |
| Bládúgva | 39 | 1 | 24 | 5 |
| Smyril | 0 | 0 | 2 | 1 |
| Kráka | 0 | 0 | 1 | 0 |
| Ravnur | 0 | 0 | 3 | 4 |
| Kvørkveggja | 0 | 1 | 0 | 0 |
| Óðinshani | 0 | 0 | 0 | 1 |
| Gráspurvur | 0 | 2 | 0 | 0 |
| Stari | 0 | 0 | 0 | 2 |
| Munkur | 0 | 0 | 0 | 1 |
| Nilksljómari | 0 | 0 | 0 | 1 |
| Samanlagt | 1616 | 212 | 494 | 181 |

*Tal av ringmerkingum og fráboðanum í 2019 og 2020*



*Kjógvapisan við litringinum FCI varð klakt í Mykinesi í 2017, og kom aftur til heimbølið í 2020*

helst var steggi á sínum fyrsta ári, funnin deyður í Oyndarfirði fýra mánaðir seinni. Hetta eru tó áhugaverdar og virðismiklar dátur, tí sera lítil vitan er til um føroyska smyrilin.

## VERKÆTLANIR

**Fleiri ringmerkingarverkætlanir hildu** fram í 2020. Millum annað gjørdi Tjóðsavnið aftur litringmerking av kjógvapisum kring landið, og eydnaðist hetta sera væl. 46 pisur vóru merktar á 8 ymiskum støðum í Suðuroy, Vágum, Mykinesi, Streymoynni, Eysturoynni, Kalsoynni og Svínoy. Serliga spennandi var fyrsta litringmerkta pisan, sum er komin aftur til Føroya at reiðrast. Hon varð skrásett í Mykinesi (sí Mynd 2). Hesin kjógvin hevði litringin FCI og var ringmerktur á sumri 2017, tá hendan verkætlanin byrjaði. Kjógvar gerast kynsbúnir á 3. ári, og tí hevði FCI væntandi gjørt eina roynd at reiðrast.

Drunnhvítakanningin hjá Jógvani Thomsen og Jens-Kjeld Jensen í Nólsoy viðgjørdi góðar 250 fuglar yvir alla reiðurstíðina. Drunnhvítarnir fingu mátað ymisk kropslig viðurskifti, sum broytast gjøgnum árið og millum ár. Millum annað verður vektin hjá nýfloygdum pisum, munir í reiðring hjá drunnhvítum av ymsum aldri, yvirliving o.s.fr. kannað. Vitanin, sum stendst av hesi verkætlan, og sum annars er savnað í Føroyum, skal gerast til eitt bókarverk, sum eftir ætlan skal útgevast í 2021.

Millum aðrar verkætlanir kunnu nevnast skrápakanning og bládúgvumerking í Nólsoy, litringmerking av ravni um allar Føroyar (sum nú fevnir um fleiri enn 150 merktir fuglar), og sporingskanningarnar á Havstovuni. Hesar seinast nevndu snúgva seg um at seta sporingstól á lunda, havhest, skráp og æðu fyri at kanna ferðamynstrini hjá hesum sløgum. Nógv áhugavert spyrst burturúr hesum sporingum, og millum annað hava tær víst, at føroyskur skrápur heldur til út fyri argentinska sjóvarmálan um veturin.

## ÁHUGAVERDAR FRÁBOÐANIR

**Tá so lutfalsliga** fáir fuglar verða fangaðir í Føroyum (undantikið veiðuna), er tað altíð spennandi, tá onkur finnur ringmerktan fugl. 181 fráboðanir komu



*Ringmerktur nilksljómari úr Finnlandi varð funnin í Sørvági hin 2. oktobur í 2020*

inn í 2020, og um drunnhvítarnir verða tiknir burturúr, so er hetta væl meiri enn í 2019. Av smáfugli vórðu funnir millum annað ein nilksljómari úr Finnlandi og ein munkur við kekkiskum ringi. Hesir endaður sínar dagar í ávikavist Sørvági og Vestmanna. Ein stari úr Nólsoy gjørdist 10 ára gamal, og er hetta fagur aldur í mun til tey 2-3 liviárini, sum teir í miðal fáa. Millum aðrar gamlar fuglar kunnu nevnast tveir 26 ára gamlir bretskir lundar og ein 26 ára gamal lomvigi, sum vórðu skotnir í oktobur. Haraftrat var eitt av elstu føroysku tjøldrunum, sum nakar veit um, skrásett í Kollfjarðardali í juni mánað. Hetta tjaldrið gjørdist minst 27 ára gamalt. Hesar áhugaverdu og óvanligu fráboðanirnar vísa, at enn kann ringmerking læra okkum nógv spennandi um føroysku fuglarnar.



*Eitt av nýtaldu drunnhvítaøkjunum í 2020 var Bólstaðlíð. Frammi til vinstru sæst nesið, ið kallast Nevið, stinga út, og omanfyri bergeggina liggur Bólstaðlíð. Til høgru sæst Steffan ávegis inn í brøttu Nýggjurð*

# FUGLAKANNINGAR Á RAMSARØKJUM Í 2020

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Í 2011 vóru tríggjar føroyskar oyggjar – Mykines, Nólsoy og Skúvoy – útnevndar til at vera Ramsarøkir. Hetta eru øki, ið hava serligan altjóða týdning fyri vátlendis- og sjófugl sambært Ramsar millumtjóðasáttmálanum frá 1971. Mykines og Nólsoy hava størstu ávikavist lunda- og drunnhvítabølini í Føroyum, og á teimum báðum oyggjunum samstarva Tjóðsavnið og Havstovan um at gera lokalar stovnsmetingar av hesum báðum sløgum**

## LUNDASTOVNURIN Í MYKINESI

**Vestara lundabølið í** Mykinesi, sum fer frá Dalinum vestanfyri bygdina og til Lamba út ímóti Hólmgjónni, er mett at vera tað størsta í Føroyum. Á hvørjum ári verða talið av reiðrandi pørum og undankoma hjá pisum kannað, og tað, at bæði Dalurin og Lamba í ávísan mun eru vallað øki ger, at teljarar sleppa framat einum stórum parti av bølinum. Tó fæst ikki nógv burturúr at telja sitandi ella flúgvandi fugl, tí tað gevur ikki ábending um, hvussu nógvir lundar hava tikið holurnar, ella hvussu gongur við at fáa pisu undan. Tí mugu holurnar kannast. Knattnet við 20x20m puntum er gjørt yvir økið, og mitt í hvørjum punti, sum er atkomiligur, verða holur taldar í einum 10 $m^2$ víðum ringi (Sí kort).

Ringurin, sum talt verður í, verður gjørdur av teljarunum á staðnum (Mynd 4). Ein bambuspinnur verður settur í mittastu knattstøðu, og eitt band verður fest í pinnin. Hetta bandið er 1,78 metrar langt, sum er radius á einum 10 $m^2$ víðum ringi. Tann eini teljarin heldur bandinum strekt og gongur runt um pinnin og telur. Allar holur, sum fella innanfyri bandradius verða kannaðar og taldar. Ein skrivari situr í nánd og skrásetur dáturnar. Holurnar verða bólkaðar í ”brúktar” og ”óbrúktar” alt eftir, um munnin ber brá av sliti/virksemi ella ikki. Eisini verður hugt inn í holurnar og skrásett verður, um skvøttur sæst í teimum. Hetta er ein góð ábending um, at pisa er í holuni, tí hon hevur lyndi til at koma út har tað lýsir at skvøtta. Úrslitið av teljingini verður síðani brúkt til at gera metingar av, hvussu nógv virkin pør eru í bølinum, og hvussu nógvar pisur koma undan (Sí talvu).



*Sildberi*

Enn eru avbjóðingar við at gera greiðar niðurstøður um stovnsstødd og -gongd hjá lundanum í Dalinum og Lamba. Úrslitini gerast tó neyvari sum mannagongdirnar verða tillagaðar. Av 33 holum, har sildberi sást fara inn og/ella har pisa hoyrdist láta, vóru 30 við skvøtti í, t.e. 91%. 58 av 345 brúktum holum høvdu skvøtt, og við hesum kann roknast, at 13% av hesum holunum hava pisu. Umleið 60.000 holur eru tilsaman í økinum, og merkir hetta, at roknaða talið av livandi pisum í 2020 var 7.754.

| | Lamba | | | Dalurin | | | Hólmur | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Óbr. | Brúkt. | Pisa | Óbr. | Brúkt. | Pisa | Óbr. | Brúkt | Pisa |
| 2011 | 93 | 56 | 0 | 97 | 44 | 0 | | | |
| 2012 | 43 | 99 | 0 | 42 | 74 | 0 | 14 | 18 | 0 |
| 2013 | 41 | 91 | 0 | 47 | 82 | 0 | | | |
| 2014 | 60 | 105 | 4 | 40 | 108 | 4 | | | |
| 2015 | 34 | 104 | 9 | 39 | 102 | 5 | | | |
| 2016 | *109* | *196* | *<85* | *187* | *207* | *<44* | | | |
| 2017 | 35 | 164 | 87 | 81 | 153 | 69 | | | |
| 2018 | 61 | 187 | 72 | 116 | 145 | 41 | | | |
| 2019 | | *123* | *<50* | | *176* | *<170* | | | |
| 2020 | *48* | *159* | *22* | *94* | *186* | *36* | | | |

*Tal av óbrúktum og brúktum holum og tal av holum við pisu í økjunum Lamba, Dalurin og Hólmur frá 2011 til 2020*



*Lundarók, sum gongur ímillum Dalin og Lamba*



*Kort yvir lundabølið í Mykinesi.*
*Reyðu puntarnir vísa til tey økini, har talt var í 2020*

## DRUNNHVÍTA-STOVNURIN Í NÓLSOY

**Drunnhvíti er, um** nakað, enn meiri avbjóðandi at telja enn lundi. Bæði fuglasløgini reiðrast í holum, men drunnhvíti grevur ikki stórvegis sjálvur og finnur sær heldur inn í glopp og rivur millum grót (Mynd 5). Haraftrat flýgur hann bert við bølið um náttina og sæst ikki um dagin, og tí síggjast næstan ongar ábendingar um, hvar reiðrini eru. Av hesi orsøk verður ein heldur serstakur framferðarháttur brúktur: ljóðupptøkur av láti hjá drunnhvíta verða spældar í bølinum, og aftursvarini úr holunum verða skrásett.

Mannagongdin fyri teljingina er tann, at 2 metur breiðar álir verða lagdar lið um lið ígjøgnum bølið. Hetta verður gjørt soleiðis, at eitt band verður drigið eftir har, sum álin skal vera, og síðani ganga tveir teljarar eftir bandinum. Ein spælur ljóðupptøku fyri hvønn 10 metur í álini, og hin skrivar upp talið av holum í álini, har svarað verður aftur. Økisflatan av álunum skal tilsamans vera umleið 5% av økinum.

Tó er tað soleiðis, at ikki allir drunnhvítar svara aftur, tá talt verður á hendan hátt. Tí verður ein sokallað ”kalibrering” ella stilling av teljingini gjørd. Eitt stillingarøki er sett av suðuri í Dølum, har talt verður fleiri ferðir eftir somu álum, og holurnar við aftursvari verða merktar hvørja ferð. Á tann hátt fær mann gjørt eina meting av, hvussu stórt lutfall av holum geva aftursvar fyri hvørja teljing.

Á hvørjum ári verða nýggj øki tald. Í 2020 varð talt í Skriðubakka og Bólstaðtanga. Á umleið 5% av økinum vórðu taldar 149 drunnhvítaholur. Tá hetta talið er stillað við svartíttleika og tættleika og síðani roknað uppá alt økið, so er samlaða talið av drunnhvítaholum í hesum báðum økinum 9.026.



*4a+b: Felthjálpararnir Eva og Steffan telja holur í Dalinum við bambuspinnum og bandi*



*5a+b: Drunnhvítar reiðrast í holum og oftast har grót er, t.d. í urðum og grótgørðum*



*6: Janus, Eva og Steffan í stillingarøkinum suðuri á Dølum*





*Stillingarøkið verður kannað. Talt verður eftir bondum ígjøgnum økið, og holur við aftursvari verða merktar*



# FUGLATELJING YVIRI VIÐ STROND

Í sambandi við at Tórshavnar Kommuna ætlar at gera gongugøtu yviri við Strond frá Skansanum til Boðanesgjónna, fekk Tjóðsavnið áheitan um at gera eina kanning av náttúruni í økinum við serligum atliti til fugl. Gøtan skal eftir ætlan gerast á markinum millum bø og fjøru

*1: Nøgvur fuglur heldur til yviri við Strond. M.a. situr nøgvur skarvur á tanganum niðanfyri Skansan ávísar tíðir á árinum*

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Kent er, at** nøgvur fuglur er í hesum økinum, og tí hevði tað týdning at meta um ávirkanina av fólkaferðslu, og hvussu gøtan kann leggjast, so hon órógvar sum minst. Ein fuglateljingarætlan varð gjørd, sum skuldi geva eina greiða ábending um, hvussu fuglur brúkar hetta økið alt árið, og hvussu lætt ymisku fuglasløgini órógvast av fólki.

## MANNAGONGD

**Lívfrøðingarnir á Tjóðsavninum** taldu hvørja viku frá 1. juli í 2019 til 29. juni í 2020, og roynt varð at telja ymiskar tíðir á degnum, sum veðrið og ljós loyvdi. Teljararnir gingu fram við fjørubakkanum frá Skansanum til Boðanesgjónna ella hinvegin, og síðani varð gingið heim aftur eftir vegnum omanfyri. Teinurin hvønn vegin er umleið 2000 metrar. Ein skrásetingarapp kallað Fulcrum varð nýtt á snildfon til at skráseta og kortleggja einstakar fuglar og fuglaflokkar. Allir fuglarnir, sum sóust fram við fjørubakkanum vórðu taldir, og tá gingið varð eftir vegnum, varð talt á teimum støðum á bønum, sum ikki sóðust úr fjøruni.

## ÚRSLIT

**Teljingin vísti sum** tað fyrsta, at nøgvur fuglur er í fjøruni yviri við Strond, og at har eru nøkur ávís støð í økinum, har teir serliga savnast (Mynd 2). Á teimum 50 teljingum, sum vórðu gjørdar, vórðu skrásettir 7958 einstakir fuglar av 51 sløgum. Tað vanligasta slagið var æða, bæði tá viðvíkur skrásetingum og tal av fuglum (mynd 3). Tilsamans vóru 2500 æður skrásettar, sum oftast í flokkum. Grágæs vóru ikki so ofta skrásettar sum t.d. teisti og tjaldur, men vóru tilsamans nógv fleiri í tali. Hetta kemst av, at tær ferðaðust í flokkum við úr nøkrum fáum og upp til 50-100 fuglar.

Ymisk sløg brúktu økið á ymiskan hátt. Svimjifuglur – harímillum æða, skarvur og teisti – var rættiliga javnt býttur yvir alt økið, tó at skarvur serliga sást við Skansan (Mynd 2b). Vaðfuglur so sum grælingar og tjøldur vóru serliga at síggja í syðra partinum av økinum frá Válgaravík og suður til Skansan (Mynd 2c). Her er sjóvarmálin væl slættari við skerum og sandi, har hesi fuglasløg kunnu leita sær eftir føði. Másafuglur (íroknað terna) var sum heild bundin at ávísum plássum (Mynd 2d). Boðanes og klettarnir sunnanfyri vórðu javnan nýttir sum hvíldarpláss av serliga fiskimása og likku, helst tí, at har er lutfalsliga góður friður. Hinvegin savnaðist terna í stórum flokkum á Eystfalsskeri. Svartbakur og fransaterna tóktust tó at brúka økið eitt sindur meira tilvildarliga.

Fuglur stygdist sera ymiskt. Grælingar tóktust leggja lítið í fólk, og fuglur, sum lá á sjónum, var heldur ikki størvegis órógvaður av tí, sum gekk fyri seg í fjøruni. Hinvegin vóru másar og grágæs sera stygg og rýmdu ofta undan, hóast teljarin var meira enn 100 metrar burturfrá. Eisini høvdu nøkur tjaldurspør reiðurspláss niðri ímóti fjøruni. Tey leikaðu í og vardu dúgliga. Hesi støðini, har styggur fuglur hvílur, ella har tjøldur reiðrast, kunnu tí roknast við at vera serliga viðkvom fyri fólkaferðslu.







*2: Kort yvir (a) allar fuglaskrásetingar yviri við Strond, og tættleika av (b) svimjifuglum, (c) vaðfuglum og (d) másum*




*3: Yvirlit yvir hvussu nógv varð talt av teimum vanligastu fuglasløgunum yviri við Strond*

## EIN SERLIG FUGLASKRÁSETING

**Nøkur spennandi fuglasløg** vórðu skrásett í hesari teljingini, men bert eitt var at rokna sum sjáldsamt. Hin 27. mai 2020 gekk ein mórugrælingur (*Calidris falcinellus*) í fullum summarbúna í fjøruni eystanfyri Skansan. Hetta er fyrsta eftirfarandi skrásetingin av hesum fuglaslagnum í Føroyum, sum annars reiðrast í norðara parti av Skandinavia og eystur ígjøgnum Siberia. Sum heild er hetta slagið sera sjáldsamt at síggja í Vesturevropa, tí aftaná bútíðina ferðast mórugrælingur í ein landsynning og hevur vetrarvist frá Eysturafrika til Avstralia. Hesin grælingurin er slektaður við m.a. fjallmurru og grágræling, sum eru vanlig sløg í Føroyum. Hóast grælingar líkjast nógv sínámillum, so kann mórugrælingur í summarbúna kennast aftur á svartflekkuta bakinum, dimma skallanum við einari ljósari rípu hvørjumegin og tí løgið skapta nevinum, sum er beint við niðurboygdum enda.



*Mórugrælingur (Calidris falcinellus) í fjøruni eystanfyri Skansan, beint niðanfyri Betri Banka*

# BEINAGRIND AV NEVHVALINUM MESOPLODON BIDENS VARÐVEITT

**Tann 3. desembur í 2015 rak ein áhugaverdur hvalur á land í Kollafirði. Talan var um tað heldur gátuføra slagið, ið verður kallað nevhvalur (*Mesoplodon bidens*). Lítið sæst til hetta hvalaslagið her, men tó hevur hann lagt beinini í Føroyum nakrar ferðir**

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Átta landgongur eru** skrásettar í Føroyum fram til 1982. Nýggjari tøl finnast ikki alment. Tó skolaði ein nevhvalur upp á Sandi í februar 2020, men lá bert ein hálvan tíma, til aldan førdi hann út aftur á sjógv.

Nevhvalurin úr Kollafirði í 2015 var eitt kvenndýr, og var hvalurin 4,64 metrar til longdar frá nevsoddi til sveivartrom. Kvennhvalir av hesum slagnum kunnu gerast upp í góðar 5 metrar langar og kallhvalir upp í 5½. Nevhvalur er so nevndur, tí kjafturin er nev- ella trantskapaður og stingur fram undan lítlu kúluni. Kroppurin tykist langur og mjáur, og bøkslini og hornið eru smá. Sveivið er ikki sýlt, sum tað er hjá flestum hvalasløgum, og kúlan er ein lítil bunga beint frammanfyri blástrið.

Hetta áhugaverda havsúgdjórið er heldur trupult at finna, og Tjóðsavnið hevur tí tryggjað, at beinagrindin blívur varðveitt. Nevhvalurin varð tikin til Kaldbaks, flensaður, skorin sundur og latin í kør at rota í feskvatni, og á heysti í 2020 fóru so lívfrøðingarnir og lívfrøðikonservatorin á savninum at hyggja at nevhvalin og kanna, hvussu rotingin hevði gingist. Beinini vórðu tikin úr kørunum, og tað sindrið av vevnaði, sum



*Nevhvalurin úr Kollafirði*

sat eftir á teimum, varð reinsað burtur. Lívfrøðikonservatorin á Tjóðsavninum, Young-Mee Rim, fekk konservatorin Signe Bonnichsen afturat sær at fáa beinagrindina snøggaða so væl sum til bar. Hetta arbeiðið gekk væl. Tó hevði langa rotingartíðin gjørt, at oljan í beinunum var tránað, og at beinagrindin tí gjørdist brún.

Vanligi nevhvalurin finst tvørtur um Norðuratlantshavið frá Norðuramerika til Madeira og upp til Labrador og Norðurnorra. Hann heldur vanliga til á 200-1500 metra dýpi og flytir seg nógv. Tí verður hann sjáldan eygleiddur til havs, og sum heild er lítil vitan um hann. Kanningar hava víst, at nevhvalur í ein ávísan mun livir av ymsum høgguslokkum og smærri fiskasløgum. Slagnavnið "bidens" kemur av, at vanligur nevhvalur bert hevur tvær tenn – eina hvørjumegin mitt á undirkjaftinum – sum bert eru sjónligar hjá kallhvalinum.

Hetta hvalaslagið verður eisini kallað Sowerby's nevhvalur ella vanligur nevhvalur, og eitt slíkt sernavn er eisini hóskandi, tí fleiri sløg av nevhvalum eru til í øllum heimshøvum. Nevhvalir hoyra til ættina Ziphiidae, og kendasta slagið í hesi ætt er um okkara leiðir døglingur (*Hyperoodon ampullatus*). Sum heild eru nevhvalir sera gátuførir og truplir at granska orsakað av, at teir allir halda til á djúpum havi langt burturi frá landi. Tí er tað næstan sum at síggja rúmdarverur, tá teir vitja um okkara leiðir.







*Hvalurin beint eftir rotingina*



*Nevhvalur springur*



*Ein reinsaður ryggjageisli*



*Skølturin verður reinsaðu*



# STUDENTAARBEIÐI Á SJÓDJÓRDEILDINI

**Til tess at vekja áhugan millum lesandi fyri savnsarbeiði, bjóðar Tjóðsavnið ymisk arbeiði í summarfrítíðini**

**Í hesum sambandi** arbeiddu Jónva Hentze og Selma Olsen í seks vikur á Sjódjóradeildini. Báðar lesa lívfrøði á Fróðskaparsetrinum.

Á Sjódjóradeildini verður upplýsandi tilfar gjørt um dýralívið í fjøruni, og tað mesta av arbeiðinum hjá Jónvu og Selmu var at savna og avmynda til hetta arbeiðið. Savnað varð inn úr ymiskum støðum og í stórum mongdum, soleiðis at ymiskleikin millum somu sløg av dýrum kundi skjalfestast.

Dýrini vóru avmyndað í náttúruni og á royndarstovuni, har Tjóðsavnið hevur framkomna útgerð at taka myndir við. Savnið av myndum kemur at verður partur av arbeiðstilfarinum, sum verður grundalagið undir tí endaliga tilfarinum.



Jónvá og Selma





Kim, Jón, Jan og Ólavur flyta gamla prámin frá Hvalastøðini við Áir út, meðan BIOFAR-menninir Høgni og Jóguan Fróði hyggja

# RUDDINGARÁTAK Á GOYMSLUNI Í KALDBAK

Høllin hjá Tjóðsavninum í Kaldbak hevur nøkur ár á baki. Eftir at Guttormur Djurhuus og Marine Plast steðgaðu at byggja kaldbaksbátarnar í høllini í 2002, gjørdist bygningurin sætið hjá BIOFAR, ið tá var knýtt at Náttúrugripasavninum. So við og við vórðu ymiskar umvælingar og uppíbyggingar gjørdar, og at enda gjørdist høllin eisini karmur um náttúrugripagoymsluna hjá savninum

**Við so nógvum** broytingum og fjølbroyttum kanningar- og savnsvirksemi hesi gott 18 árini slepst ikki undan, at órudd hópast upp: hálvvirknir arvalutir, gomul tøkni, óviðkomandi innbúgv og ikki minst gátufør útgerð, sum “kanska fór at vera hent at hava”. Haraftrat koma og fara starvsfólk, virksemi og skipanir broytast (kanska oftari, enn gott er), og ábyrgdir skifta herðar. Ikki er løgið, at ein goymsla, ið sær so mangt ymiskt ígjøgnum ár og dag, gerst ovurfylt og trupul at fáa yvirlit yvir.

Av hesi orsøk var á heysti í 2020 tikið stig til at gera eitt ruddingarátak í Kaldbak. Eitt ruddingartoymi fór í gongd mikudagin tann 14. septembur og helt fram restina av vikuni. Sum tað so mangan vísir seg, so var arbeiðið nógv størri í vavi, enn starvsfólkini høvdu hildið áðrenn. Men tíbetur bar til at fáa alt størri burturkast úr høllini, og ein stórur partur av tí smærra eisini. Ruddingin snúði seg tó ikki bert um burturkast, men eisini um at flyta gripir, sum hóskaðu seg betri aðrastaðni. Millum annað varð ein lítil prámur frá Hvalastøðini við Áir – ein jolla – fluttur á goymsluna í Smiðjugerði.

Í dag er munandi rúmligari og betri yvirlit í Kaldbakshøllini. Eitt sindur er tó eftir at skipa og rudda. Millum annað hevur frystigoymslan verið heldur stúvað, men hon er tó væl á veg at blíva skipað og nýtsluvinarlig aftur. Ruddingin hevur av hesi orsøk gjørt dagliga virksemið hjá starvsfólkunum nakað léttari, og tað skal ikki undirmetast, hvønn týdning slíkt hevur fyri trivnaðin.

*Herdis, Jan og Petur rudda á turrgoymsluloftinum, har millum annað beinagrindin av einum meira enn 20 metra longum nebbafiski liggur í varðveitslu. Kim tekur óruddið omanav við trukkinum*



*Ólavur og Petur taka niður síðstu restirnar av einum skirvisligum skápi*



# TJÓÐSAVNIÐ SKAL UMSITA UNESCO SÁTTMÁLAN UM VERJU AV SIÐAARVI

Í august 2020 legði UMMR UNESCO-sáttmálan um verju av siðaarvi út til Tjóðsavnið at umsita. Við løgtingssamtykt 19. apríl 2018 tóku Føroyar undir við UNESCO-sáttmálanum um verju av siðaarvi frá 2003. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar frá 1. oktobur 2018 sum partur av staðfestingini av sáttmálanum hjá danska kongaríkinum. Higartil hava 178 statir tikið undir við sáttmálanum



*Føroyskir róðrarbátar við bryggju á Eystaruvág í Havn*

**Endamálið við sáttmálanum** er at verja livandi siðaarvin, at skapa siðaarvinum livilíkindi í samfelagnum, og at tryggja, at livandi siðaarvurin kann verða varðveittur fyri eftirtíðina.

Við at taka undir við sáttmálanum hava Føroyar bundið seg til at taka neyðug stig til at tryggja siðaarvin í landinum, at seta í verk skipanir og tiltøk, ið eru við til at varðveita og at fáa vitanina um og kunnleikan til siðaarvin bornan víðari til komandi ættarlið.

At verja siðaarvin merkir sambært sáttmálanum at taka stig, ið tryggja siðaarvinum lívføri, herundir at eyðmerkja, skráseta, granska, varðveita, kunna um, styrkja, at bera vitanina um og kunnleikan til siðaarvin víðari til komandi ættarlið og at birta nýtt lív í ymsar tættir av siðaarvinum.

Av tí at hetta er eitt sera umfatandi øki, lýsti Tjóðsavnið eftir savnsvørði at taka sær av uppgávuni burturav. 1. desember var Kristina D. Christiansen, antropologur, sett í starv sum savnsvørður á fólkalívsdeildini.



*Nýggja nevndin saman við landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum. F.v. Annika Sølvará, Elsbeth Heðinsdóttir, Herleif Hammer, Jenis av Rana, Annika Smith og Eilif Gaard*

## NÝGGJ UNESCO NEVND TILNEVND

**Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum**, Jenis av Rana, hevur tilnevnt nýggja UNESCO nevnd. UNESCO nevndin verður tilnevnd fyri 4 ár í senn. UNESCO er ST-stovnur fyri útbúgving, vísindi, mentan og samskifti.

Endamálið hjá UNESCO nevndini er at fremja UNESCO arbeiðið í Føroyum og virka sum ráðgevi hjá landsstýrinum í málum UNESCO viðvíkjandi. Harumframt skal nevndin virka sum bindilið millum UNESCO og føroyskar myndugleikar, stovnar og feløg innan útbúgving, vísindi, mentan og samskifti.



*Kristina Djurhuus Christiansen, antropologur*

**Í UNESCO nevndina fyri 2020-2024 eru hesi tilnevnd:**

- Herleif Hammer, stjóri á Tjóðsavninum, formaður
- Annika Sølvará, stjóri í Granskingarráðnum
- Eilif Gaard, stjóri á Havstovuni
- Annika Smith, landsbókavørður, Landsbókasavnið
- Elsbet Heðinsdóttir Christiansen, umboð fyri ung eftir tilmæli frá Føroya Ungdómsráð

**Harafturat hevur landsstýrismaðurin** tilnevnt Margrethu Jacobsen, fulltrúa í Uttanríkistænastuni, at varða av UNESCO málum á uttanríkisøkinum. Armgarð Weihe, fulltrúi í Uttanríkis- og mentamálaráðnum, er virkandi aðalskrivari hjá nevndini.

## FØROYSKI BÁTURIN TILNEVNDUR TIL UNESCO LISTAN YVIR SIÐAARV

**Føroyar hava saman** við hinum norðurlondunum tilnevnt norrøna súðubygda bátin til UNESCO listan yvir umboðandi siðaarv.

Føroysk feløg, bátasmiðir og Tjóðsavnið hava í fleiri ár arbeitt saman við norðurlendskum áhugafeløgum, søvnum og bátasmiðum um eina felags norðurlendska tilnevning av norrøna súðubygda bátinum til UNESCO listan yvir umboðandi siðaarv. Tíðliga í 2020 tók landsstýrið undir við ætlanunum um eina felags norðurlendska tilnevning, og týsdagin 24. mars 2020 varð tilnevningin handað UNESCO.



*Føroyskur dansur er eitt av føroysku evnunum at fáa á listan hjá UNESCO viðvíkjandi heimsarvi. Myndin er frá brúdleypi í Kirkjubø í 1968. Mynd Adam Woolfit*

Føroyski báturin er ein týðandi partur av okkara siðaarvi, men verður einki gjørt, er vandi fyri, at livandi bátasmíð og vitanin um føroyska bátin doyr út millum fólk. Føroyski báturin sæst framvegis í brúki, um enn mest sum kappróðrarbátur, men bátasmiðirnir fækkast, og føroyski báturin verður alsamt meiri trokaður til síðis av glastrevjabátum.

Endamálið við tilnevningini er at varpa ljós á og skapa grundarlag fyri at vitanin um bátin, bátasmíðið og brúkið av bátinum kann verða varðveitt og ført víðari til komandi ættarlið.

Um alt gongur eftir ætlan kemur norrøni súðubygdi báturin á UNESCO listan í desember 2021.



*Herleif Hammer, Annleyg Patursson og Ólavur Reinert avmyndað av Tóri Mikkelsen, sum var og vitjaði í sambandi við eina morgunsending í KvF*



Urtagarðurin í Kúrdali á vári 2020, áðrenn farið var undir at burturbeina sponsku hindberini



Ruddingin er farin í gongd inni í urtagarðinum niðri í Hoyvík



*Lítla gravimaskinan við serliga runnasaksinum*



*Vøkru laðaðu garðarnir eru komnir til sjóndar aftur*



# NÝGGJUR BOTANISKUR URTAGARÐUR Í HOYVÍK

Tjóðsavnið hevur í longri tíð havt ætlanir um at raðfesta plantuøkið, við m.a. at gera miðlanina av føroyskum plantum betri. Ein liður í hesari ætlan er at raðfesta ein urtagarð við føroyskum plantum

**Tjóðsavnið (fyrr Føroya** Náttúrugripasavn) hevur í mong ár havt ein urtagarð á Debesartrøð við føroyskum plantum burturav. Talan er um ein sokallaðan botaniskan urtagarð, har livandi føroyskar plantur vera sýndar fram eftir ávísari skipan.

Virksemið hjá Tjóðsavninum er fyri tað mesta í Hoyvík, annaðhvørt í Brekkutúni ella á Kúrdalsvegi. Tað er her, at vit fáa so at siga øll vitjandi, tí var hildið rættast at leggja ein nýggjan urtagarð í Hoyvík. Á henda hátt kundi framsýningin í Brekkutúni, framsýningin av Hoyvíksgarði og nýggi urtagarðurin fáa gagn hvør av øðrum í sambandi við tey vitjandi.

## TRÍGGIR URTAGARÐAR

**Statens Forsøgsvirksomhed byrjaði** í 1920 eitt royndarvirksemi í Hoyvík. Í byrjanini brúkti mann bygningarnar á Hoyvíksgarði, men so við og við komu fleiri bygningar afturat, m.a. sethúsini, har forstandarin, Ejnar Knudsen, skuldi búgva við familju sínari. Tríggir urtagarðar vóru eisini gróðursettir: ein í Kúrdali, ein kring sethúsini og ein longri niðri móti Hoyvíkini. Ivasamt er, hvønn leiklut urtagarðarnir høvdu beinleiðis við virksemið á royndarstøðini, tí urtagarðarnir vóru mest nýttir til prýðisplantur.

Tá royndarvirksemið helt uppat í



Hoyvík í byrjanini av 80árunum, fullu urtagarðarnir í órøkt. Seinastu árini hava urtagarðarnir verið fjaldir undir runninum "spanskt hindber", og høvdu runnarnir lyndi til at spjaða seg víðari út í bøin. Tí hevur ynski leingi verið um at fáa tikið burtur runnarnar og at fáa urtagarðarnar framaftur.

## "EINKI ER SO RINGT AT TAÐ IKKI ER GOTT FYRI OKKURT"

**Hetta kundu vit** ásanna, tá koronastøðan tók seg upp á vári 2020. Eins og flest onnur arbeiðspláss vóru vit noydd at steingja eina tíð, og fleiri av ætlanum Tjóðsavnsins fyri 2020 vóru sleptar ella útsettar. Hetta gjørdi, at rásarúm bleiv til at fara í gongd við aðrar verkætlanir, sum kundu fremjast í tráð við tilráðingarnar í sambandi við koronu, harímillum at rudda og endurskapa urtagarðarnar.

Við serligari maskinútgerð vóru hindberjarunnarnir kliptir niður, og í tí niðara urtagarðinum var jørðin eisini velt, so at røtunar kundu takast upp. Hetta gjørdist eitt heldur størri arbeiði, men úrslitið í 2020 var so, at laðaðu urtagarðarnir komu framaftur, og í tí niðasta varð farið í gongd at seta føroyskar plantur niður. Annleyg Patursson hevur staðið fyri sniðgevingini og plantingini, meðan Ólavur Reinert hevur gjørt jørð- og grótarbeiðið.

*Menn undir hoybyrðu. Aftanfyri sæst urtagarðurin í Kúrdali. Herálvur Geyti tók myndina í 1934*



# MINNISTALVAN Í GOMLU KIRKJUNI Á NESI

**Í 2019 var minnistalvan í Nes kirkju, sum Andreas Djurhuus, prestur í 1774, læt gera til minnis um báðar konurnar hjá sær, sum doyðu í barsilssong, send til konservering. Minnistalvan kom aftur í 2020 – ikki sum nýggj, men styrkt til komandi tíðir**




*Kórveggurin, nú bæði altartalva og minnistalva eru konserveraðar*

Súsanna Joensen, konservator

Í mong ár hevur henda minnistalva hingið á sakristivegginum; baksíðan vendi út í kirkjuna og framsíðan inn móti kórvegginum. Kirkjufólkið hevur bert sæð ovasta partin av talvuni, og mong hava helst ikki givið sær far um hana.

Tá Søren Bernsted, chefkonservator, Kunstkonserveringen Øst, kannaði støðuna hjá øðrum altartalvunum, kannaði hann eisini minnistalvuna, ið var sjónliga merkt av aldri og av hvar hon hevði hingið í nærum 250 ár.

Umframt eina langa rivu var æðramáling (marmorering) og gylling á listum nærum burtur, máling var eisini losnað, nógvastaðni var gylti perlubordin horvin eins og tekstur manglaði.

Tað var greitt, at hetta fór at verða drúgt og kostnaðarmikið arbeiði. Søren Bernsted gav tilboð uppá, hvussu minnistalvan kundi viðgerast. Undir øllum umstøðum mátti minnistalvan til Danmarkar, har Kunstkonserveringen Øst hevur síni verkstøð, og arbeiðsumstøðurnar eru góðar. Tikið varð av tilboðnum, og stuðlaðu dómpróstur og Føroya stiftsstjórn hesi avgerð.

Nú minnistalvan er sett so væl í stand var hildið, at kirkjufólkið átti at sæð henda mentanardýrgrip, tá komið verður í kirkju. Avbjóðingin var at finna eitt pláss, ið umframt at vera sjónligt, eisini verjir talvuna móti óneyðugum sliti.

Á ástaðarfundi við kirkjuráð, prest og konservator savnsins, samdust vit at flyta nummartalvuna vinstrumegin altarið út í kirkjurúmið. Í staðin skuldi minnistalvan hangast, har nummartalvan hekk og somikið høgt, at tað ber til at sita undir minnistalvuni uttan at koma henni ov nær.



*Minnistalvan áðrenn konservering*



*Ovasti partur áðrenn konservering*



*Niðasti parturin áðrenn konservering*



*Ovasti partur eftir konservering*



*Niðasti partur eftir konservering*



*Minnistalvan eftir konservering*

# Fornminnisnevndin



*Fornminnisnevndin fær sær ein kaffimunn eftir ástaðarfund í Gamla Bókhandli. F.v. Herleif Hammer, Tórálvur Weihe, skrivari, Julianna Klett, forkvinna og Jóhan Laksáfoss*

**Fornminnisnevndin hevði eitt** sera virkið ár í 2020. Nevndin hevði í 2020 tilsamans 11 fundir, harav tveir vóru ástaðarfundir. Til viðgerðar vóru mál av ymiskum slagi. T.d. viðgjørdi nevndin mál viðvíkjandi friðaðum kirkjum, umbygging í friðaðum bygningum, umsóknir um endurbygging av neystum, umsóknir um at taka toftir og øki úr friðing í sambandi við útbygging og velting.

Nógv størsta málið í 2020 var at reisa eitt friðingarmál í Hoydølum. Eftir drúgt kanningararbeiði av virkseminum á sanatoriinum og tuberklasjúkrahúsinum og kanningum av søguni hjá bygningunum, var friðingaruppskot sent til almenna hoyring á heysti 2020. Uppskotið snúði seg um at friða allar bygningar og bygningslutir, sum hava at gera við tuberklasjúkrahúsið og sanatoriið í Hoydølum. Harafturat var skotið upp at friða tey øki, sum knýta seg at virkseminum uttandura, t.d. fløtuna, krokkvøllin og gøtuskipanina í dalinum.



*Hoydalar í dag. Gamla Hús ella "Dreingjakostdeildin", sum húsið var rópt, tá skúli var í Hoydølum*





*Jógvan Róin*



*Atli Arnfinsson Thomassen*

# PRAKSISLÆRA Á TJÓÐSAVNINUM

**Heysthálvuna 2020 vóru tveir søgustudentar á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum í praksislæru á Tjóðsavninum. Praksislæra, sum er partur av masterútbúgvingini, er eitt uppihald á stovni ella arbeiðsstaði. Endamálið við læruni er at menna akademisku førleikarnar og fáa knýtt eitt samband millum útbúgvingina og arbeiðsmarknaðin**

Jógvan Róin og Atli Arnfinsson Thomassen vóru á savninum frá august til novembur og arbeiddu eftir avtalu við ítøkiligum savnsfrøðiligum evnum, sum savnið kundi fáa brúk fyri og sum eisini mentu teir akademiskt at skriva og verja eina støðri uppgávu.

## GRIND – EIN LIVANDI MENTANARARVUR

**Atli Arnfinsson fór** í holt við eitt praktiskt evni, *Grind – ein livandi mentanararvur*. Hetta var ein hugsað framsýning um grindadráp, og vísti hann á ymisk ástøði og háttaløg. Evnið fevndi bæði um lívfrøði og mentan, og hvussu miðlanin av hesum kundi gerast. Atli arbeiddi út frá mentanarsøguligum sjónarhornum og kannaði gripir og annað tilfar á savninum. Hetta skuldi sjálvsagt vera í samsvar við endamálini hjá einum savni at varðveita, skráseta og sýna fram, at hava almennt upplýsingarvirksemi og undirvísing annars. Harnæst var at skilja mentanararvin sum felags minni um samfelag og liviumstøður hjá farnum ættarliðum. Avmarkingar skuldu gerast, og eisini skuldi fáast ein heildarfatan av, hvønn leiklut, ið grind hevur havt í føroysku fólkamentanini. Innihaldið í hugsaðu framsýningini var fyrst at hyggja nærri at tí lívfrøðiliga partinum, um stovnin hjá grindahvali, lýsing av nýtsluni av grind, sjálvum drápinum, reiðskapinum, býtinum av grind, um týdningin, grind hevur fyri samleikan og mentanina í Føroyum.

## MENTANAR-ARVUR Á BYGD

**Jógvan Róin hevði** eisini eitt ítøkiligt evni, *Mentanararvur á bygd. Ein kanning av bygdasøvnunum í Føroyum.* Jógvan gjørdi bæði eina kvantitativa kanning av, hvussu tey mentanarsøguligu bygdasøvnini, ið fáa árligan stuðul frá landinum, umsita materiella mentanararvin, og eina kvalitativa kanning av, hvussu fýra vald mentanarsøgulig bygdasøvn hava royndt at fylgja fakligu tilmælunum frá Tjóðsavninum. Hugt varð eftir, hvussu karmarnir og umstøðurnar vóru at røkja skyldurnar at skráseta, varðveita bæði gripir og bygningar og at miðla mentanararvin. Eitt kvantitativt spurnablað varð sent øllum bygdasøvnunum. Harnæst varð eitt sonevnt samrøðugrundað kvalitativt casestudy gjørt av teimum fýra valdu bygdasøvnunum. Millum úrslitini kom fram, at 23.5% av bygdasøvnunum ikki skráseta gripir, at 68.75% fremja ikki uppgávuna at varðveita – at konservera gripir. Viðvíkjandi miðlan av mentanararvinum sæst, at søvnini í fleiri førum hava opið part av árinum – 56.25%, ella eftir nærri avtalu – 31.25%, meðan bara tvey søvn siga seg hava opið dagliga. Kanningin er dulnevnd og ikki almenn, og bert Fróðskaparsetur Føroya og Tjóðsavnið hava atgongd til úrslitini av kanningini.

# Varðveitingar-arbeiðið í Stokka-stovuni í Tinganesi

Arbeitt hevur verið í nøkur ár við spurninginum um varðveitslu av Stokkastovuni. Í 2016 vóru umfatandi dendrokronologiskar kanningar gjørdar av Stokkastovuni og haraumframt uppskot til hvussu varðveitingararbeiðið kundi gerast. Serfrøðingar úr Norra, m.a. umboð frá norska ríkisantikvarinum komu til Føroya at gera hetta arbeiðið

Tórolvur Weihe, savnsarkitektur

**Ein stórur partur** av arbeiðinum hjá bygningadeildini á Tjóðsavninum í 2020 snúði seg um Stokkastovuna í Tinganesi.

Dendrokronologisku tíðarfestingarnar vístu, at tilfarið í bygninginum var skjóttvaksin grann, feld í vetrarhálvuni 1683-1684, og at trøini høvdu vaksið í Suðurnoregi, helst í økinum eystanfyri ella vestanfyri Oslo.

Hetta var serliga áhugavert, tí stórur ivi hevur verið um aldurin á Stokkastovuni. Higartil er ikki komið fram á tilfar um, nær Stokkastovan er sett upp, ella hvussu gomul hon í veruleikanum er. Tað einasta, ið miðast kundi eftir, var, at ytri parturin av Tinganesi brendi í 1673, eisini økið, har Stokkastovan nú stendur, og at sýnið í 1709, tá Kgl. Handil yvirtók eftir einahandilin hjá Gáblunum, sigur "Når samme blokkestue med tilbehør er opbygget og af hvad år, vides ej." (Endurgivið eftir Lous Zachariassen "Úr Føroya søgu – um ár 1700" felagið Varðin, Tórshavn 1952.)

Gitingar hava verið um, hvørt hetta merkti, at Stokkastovan kundi vera ein eldri stokkastova, sum hevur staðið aðrastaðni í Havn, og sum seinni er flutt á staðið, har hon nú stendur. Men við dendrokronologisku úrslitinum er neyðugt at fara burtur frá hesum.



*Umvælingarnar frá 1980-unum verða kannaðar*

## AÐRAR KANNINGAR Í 2020

**Í oktobur gjørdi** Tjóðsavnið skrásetingar av, í hvønn mun skaðar vóru komnir síðani umvælingina í 1980-unum - bæði á uppruna og útskift tilfar.

26. og 27. oktobur komu sviarnir Gunnar Almevik og Kalle Melin aftur til Føroya. Mátingar vórðu gjørdar við einum serligum tóli, sum kundi máta um møguligt rot var inni í stokkunum. Staðfest var, at standurin á stokkunum í norður-, eystur- og suðursíðu yvirhøvur var góður, meðan verri var við stokkunum á vestursíðuni. Ískoytisroyndir vóru eisini tiknar av skrástívarum og av klædningi, umframt at royndir eisini vóru tiknar av tjøru og eldri máling, sum skuldu sendast til kanningar í Norra.

Áðrenn sviarnir fóru heimaftur, gjørdu teir ein lista yvir timbrið, ið skuldi bíleggjast frá norska ríkisantikvarinum. Tílíkt tekur tíð, men roknast kann við, at tilfarið er tókt í 2022.







# TVEIR SEYÐIR SKRÆDLAÐIR

Tað hevur leingi verið eitt ynski at fáa fleiri útstappað dýr á savnið



**Útstappað dýr siga** so nógv meiri enn myndir og tekningar, og í 2020 beyðst høvi at fáa til vega tveir útstappaðar føroyskar "nútímans" seyðir.

Farið varð undir at fyrireika eina nýggja framsýning við yvirskipaða evninum føroysk ull. Ætlanin við framsýningini er at lýsa flest øll viðurskifti við seyði og ull í Føroyum frá landnámstíð til í dag. Framsýningin verður stór í vavi og fer at fylla fleiri rúm. Í hesum sambandi er ætlanin, at framsýningin byrjar við tveimum útstappaðum lombum, einum veðurlambi og einum gimburlambi.

Av tí, at vit í Føroyum ikki hava kunnleikan at gera slík stór útstappingararbeiði, var heitt á konserveringsfyritøku í Jútlandi at gera arbeiðið fyri okkum. Tveir zoologiskir konservatorar komu tí úr Danmark at fáa skinnini av lombunum á ein hóskandi hátt. Ikki var talan um vanliga fletting, sum vit kenna tað, men heldur vóru skinnini skrædlað av kroppunum, so m.a. nøs og kleyvar sótu føst í skinnunum. Sum myndirnar vísa, so sær mannagongdin eitt sindur marghátligt út.

Framsýningin letur eftir ætlan upp á sumri 2021.

# SEMINAR UM STOKKASTOVUNA Í TINGANESI



*Tikið varð frá eysturendanum og hugt at, hvussu stóð til innanfyri*

22. til 24. septembur 2020 varð eitt norðurlendskt seminar um Stokkastovuna. Endamálið við seminarinum var millum annað at savna ein bólk av fakfólki, sum skuldi virka sum ráðgevarar í fyrireikingini og undir sjálvum arbeiðinum

Tórálvur Weihe, deildarleiðari

**Seminarið fór fram** í nýinnrættaða kjallaranum í Sethúsunum úti í Tinganesi. Luttakararnir vóru:

Úr Svøríki: Gunnar Almevik, professari á Göteborg universiteti, granskari í gomlum handverki og Karl-Magnus (Kalle) Melin, timburmaður og fornfrøðingur.

Úr Noregi: Leif Anker, Riksantikvaren (luttók umvegis skíggja) og Erlend Gjelsvik, timburmaður (luttók umvegis skíggja).

Frá Løgmansskrivstovuni: Flóvin Eidesgaard, fíggjarráðgevi, og Oluf Reinert Djurhuus, húsavørður.

Frá Tjóðsavninum: Tórálvur Weihe, savnsarkitektur, Helgi D. Michelsen, deildarleiðari, Símun V. Arge, fornfrøðingur, Sune Strøm, savnshandverkari, og Herleif Hammer, stjóri.

Frá Landsverk: Bárður í Baianstovu, arkitektur.

Handverkarar: Ingi á Tórgarði og Martin Mørk, timburmenn, stóðu fyri at rigga til útgerð og taka klædning frá í sambandi við kanningararbeiðið. Teir luttóku eisini í parti av seminarinum.

Fundarskrivari: Lilja Thorsteinsson, arkitektur.


*Seminarið um Stokkastovuna var hildið í nýinnrættaða kjallaranum undir Sethúsunum, sum er næsti granni hjá Stokkastovuni. Á myndini síggjast frá vinstru Símun, Sune, Helgi, Herleif, Oluf, Gunnar, Flóvin, Kalle, Ingi, Martin og Lilja*

Fyrsta dagin var farið at hyggja at ymsu pørtunum av Stokkastovuni og Bøkjarínum, sum er bygt uppí. Eisini varð hugt at teimum skaðum, sum fyrr eru staðfestir á bygningunum. Søguliga vitanin um Stokkastovuna var gjøgnumgingin, harímillum skjalatilfar, myndatilfar og rannsóknir, sum hava verið síðani 1898 og fram til í dag.

Vitjað var í hinum bygningunum úti í Tinganesi fyri hyggja at, hvussu har er varðveitt, restaurerað og útgrivið. Dagurin endaði við vitjan í Kirkjubø, har hugt var at Stokkastovunum og Roykstovuni.

Annan dagin vóru fleiri framløgur. Gunnar Almevik greiddi frá um altjóða meginreglur fyri varðveitslu, og hvussu hetta ítøkliga kundi førast yvir til arbeiðið við Stokkastovuni. Erlend Gjeldsvik greiddi frá og vísti dømi uppá umvælingararbeiði á stokkastovur í Noregi, meðan Kalle Melin greiddi frá líknandi arbeiðum í Svøríki.

Triðja dagin var Stokkastovan kannað gjøllari. Á eystari síðu er klædningur uttaná stokkunum, og tí var nakað av klædninginum tikin frá fyri at kanna tilfarið innanfyri. Á sama hátt var eisini hugt nærri at vesturendanum. Seinni um dagin gjøgnumgekk Tórálvur Weihe partar av roknskapunum hjá Kgl. Handlinum. Fleiri ferðir verða rotskaðar nevndir í sambandi við uttandura trappuna á vestursíðuni til loftið, men eisini t.d. hvat tilfar hevur verið nýtt til ymsar umvælingar.

## NIÐURSTØÐA

**Ein av niðurstøðunum** av seminarinum var, at eitt yvirlit yvir neyðuga tilfarið, sum skal útvegast til umvælingina, skuldi gerast sum skjótast. Talan var um grann og furu av serligari góðsku og í serligum støddum. Leif Anker metti, at norski Ríksantikvarurin kundi fáa til vega hetta serliga tilfar.

Ein onnur niðurstøða var, at Stokkastovan var í betri standi, enn væntast kundi av einum 300 ára gomlum timburbygningi. Ein orsøkin kann vera, at bygningurin hevur staðið uttan hita, tí innandurahiti kann trýsta fukt út í stokkarnar, sum so kann elva til rot. Hetta er nakað, sum skal havast í huga, tá innleggingar og nýtsla av Stokkastovuni verður umhugsað.


*Eisini á vesturendanum varð farið upp við lyftu*




# SKEIÐ Í FOTO OG FOKUS-STAKKING

Í Kaldbak hevur Tjóðsavnið gjørt íløgur í serlig høli og útgerð til framkomna myndatøku. Í januar var skipað fyri innanhýsis skeiði í, hvussu hendan útgerðin kann brúkast. Við útgerðini er gjørligt at taka hágóðskumyndir bæði av stórum lutum og heilt smáum lutum.


*Fýra luttakarar av Fornfrøðideildini vóru á skeiðnum*

## SKEIÐIÐ VARDI Í TVEIR DAGAR OG FEVNDI UM

- Nýtslu av fototólum, objektivum (linsum), stativum, støðuljósi og blitsi
- Ástøðilig og verklig nýtsla av tíð, blendu og ISO
- Ástøðilig og verklig nýtsla av fokusstakking
- Objektiv við manuellum fokusi og motordrivnum stakktóli
- Objektiv við auto fokusi við stýring á fartelefon
- Helicon forrit til viðgerð av stakkfokusmyndum
- Eftirviðgerð av stakkmyndum (Photoshop og Lightroom)

# TJÓÐSAVNIÐ VITJAR Á TÓRSHAVNAR BÝARSAVNI



Margretha Nónklett, savnsleiðari, tók ímóti og greiddi frá arbeiðinum við framsýningini

**Tjóðsavnið vitjar javnan** bygda- og býarsøvn kring landið. Í sambandi við at Tórshavnar Býarsavn gjørdi framsýningina "Havnin undir krígnum", var høvi hjá starvsfólkunum á Tjóðsavninum at vitja býarsavnið. Henda spennandi framsýning var í hølum býarsavnsins á Frúutrøð, og hóskaðu tey sera væl til júst hesa framsýning, tí á Frúutrøð var stór bretsk hernaðarlega nevnd "Lady Field Camp".

*Hesin bonkur var í 1961 latin Havnar býi sum gávu. Tað var enska felagið fyri gamlar hermenn í Føroyum, sum læt gávuna. Bonkurin stóð fyrstu árini í viðarlundini í Havn*





*Umboð frá 12 bygdasøvnum og Tjóðsavninum luttóku á skeiðnum*

# SARA-SKEIÐ 2020

## Tjóðsavnið skipaði 10. og 11. mars 2020 fyri grundskeiði í skrásetingarskipanini SARA. Thomas Meldgaard og Inge Bucka Mejlhede frá ODM vóru skeiðshaldarar

**Skeiðið var ætlað** teimum, sum standa fyri skráseting av søguligum gripum á Tjóðsavninum, og teimum bygdasøvnum, sum hava atgongd til ella ætla sær at brúka skipanina.

14 skeiðsluttakarar vóru frá bygdasøvnunum og 8 frá Tjóðsavninum.

SARA er nýggja skrásetingarskipanin til gripir og samlingar, sum avloysir Regin (Regfo). Slots- og Kulturstyrelsen í Danmark hava havt høvuðsábyrgdina av verkætlanarleiðsluni av skipanini, meðan Axiell hava ment sjálva skipanina.

# OIKOS 2020

**Leivur Janus Hansen** luttók á ráðstevnu í Reykjavík 3. til 5. mars 2020. Hetta var ráðstevna, ið norðurlendska felagið Oikos (www.nordicsocietyoikos.org) fyriskipar annaðhvørt ár og evnið er vistfrøði í Norðurlondum. Hesaferð varð tað undir heitinum Ecology in the Anthropocene (vistfrøði í mannaøldini).



Alfred Olsen við kanónina á Nesi

# STARVSFÓLKADAGAR VIÐ SKÁLAFJØRÐIN

## 29. og 30. oktobur vóru starvsfólk Tjóðsavnsins til starvsfólkadagar. Hesa ferð var Hotel Runavík karmurin um tiltakið

**Skráin fyrra dagin** var fjølbroytt. Byrjað var við hjartastartaraskeiði. Síðani var fyrilestur við Bergtóru Høgnadóttir Joensen. Seinnapartin var farið gongutúr kring Toftavatn saman við Anette Sonne, sum greiddi frá ætlanunum við økinum við Løkin og kring Toftavatn. Eisini greiddi Anette frá listaverki hennara ”Náttúrunnar listaverk”. Hetta er ein installatión, sum Anette í samstarvi við Tjóðsavnið hevur sett upp kring norðrara part av Toftavatni.

Seinna dagin varð vitjað í friðaðu Nes kirkju. Tjóðsavnið skipaði saman við meinigheitsráðnum á Nesi fyri, at minnistalva úr Nes kirkju var send til Danmarkar til umvælingar. Súsanna Joensen greiddi frá hesum arbeiði. Úr kirkjuni var farið yvir til kanónina, har Alfred Olsen, fyrrverandi løgtingslimur fyri Sambandsflokkin, tók ímóti okkum. Hann greiddi frá virkseminum hjá eingilskmonnunum á staðnum undir seinna heimsbardaga. Eisini greiddi hann frá, hvussu kanónin var komin afturíaftur eftir at hava ligið í sjónum í meiri enn 50 ár.

Eftir vitjanina við kanónstøðina bjóðaði Alfred okkum yvir á Saltnes í Grásteinshúsið. Grásteinshúsið er fyrsta hús á Saltnesi. Afturvið einum kaffimunni greiddi Alfred okkum frá sjáldsomu søguni um Olgar (Óla Kristian Joensen), sum læt húsini byggja, tá hann hevði fingið trøðina frá sjálvum Kristian VIII eftir eina vitjan hjá kongi í 1845.

Eftir eina stutta vitjan í Garðahúsinum í Søldarfirði var farið út á Strendur at vitja Sjóvar Fornminnasavn. Karmurin um virksemið hjá Sjóvar Fornminnissavni er gamli handilin á Høvdanum og Turkihúsið, sum er samanbygt við handilin. Sjóvar Fornminnissavn er helst tað bygdasavnið í Føroyum, sum hevur størstu framsýningina.






*Rammurnar hjá Anette Sonne eru tómar. Náttúran er motivið*



*Inni í handlinum á Høvdanum*



*Inni í Gráasteinshúsinum*



*Jassarnir undirhildu um kvøldið*



*Malena Thomsen er forkvinna í Sjóvar Fornminnafelag*



*Rúni Christiansen stóð fyri hjartastartaraskeiðinum. Her vísir hann Hákuni og Josefinu, hvussu hjartamassaga og eftirgjørdur andadráttur skal gevast*



*Súsanna Joensen greiðir frá í Nes kirkju*



*Minnistalvan í Nes kirkju*




*Stuttligt var at síggja gomlu vørurnar á hillunum*

# MIÐLAN 2020

18.02.20 **Herleif Hammer.** Framløga fyri Visit Faroe Islands um Koltursætlanina

28.04.20 **Herleif Hammer.** Framløga fyri Visit Tórshavn um Koltursætlanina

07.10.20 **Herleif Hammer.** Framløga fyri starvsfólki á Løgmannsskrivstovuni um Koltursætlanina

08.10.20 **Jan Sørensen** fyrilestur um lívið í fjøruni í sambandi við umhvørvisvikuna hjá Tórshavnar Kommunu

08.10.20 **Jón Aldará.** Fyrilestur um fuglalív í sambandi við umhvørvisvikuna hjá Tórshavnar Kommunu

12.10.20 **Kolbrún í Haraldsstovu:** "Planturnar í Føroyum". Fyrilestur í Brekkutúni í sambandi við savnsfagnað

14.10.20 **Jón Aldará:** "Djórini og planturnar". Fyrilestur í Brekkutúni í sambandi við savnsfagnað

15.10.20 **Helgi D. Michelsen:** "Plantuleivdir í fornfrøðini í Føroyum". Fyrilestur í Brekkutúni í sambandi við savnsfagnað

16.10.20 **Bjørn Patursson:** "Føroyska kornið". Fyrilestur í Brekkutúni í sambandi við savnsfagnað

20.10.20 **Herleif Hammer.** Framløga fyri Løgtingsins vinnunevnd um Koltursætlanina

## ÚTGÁVUR


**Jón Aldará, Sjúrður Hammer, Kasper Thorup and Katherine R. S. Snell, 2019.** "Determining hatch dates for skuas: an egg density calibration curve". Seabird 32/2020.

**Hansen, L. J., & Jensen, J.-K. (2020).** Súgkjaftar (Insecta: Hemiptera) í Føroyum / Hemiptera in the Faroe Islands. Fróðskaparrit - Faroese Scientific Journal, 65–66, 1.

**Hansen, L. J., & Gíslason, G. M. (2020).** Trichoptera in the Faroe Islands. Zoosymposia, 134(18), 127–134.




# TJÓÐSAVNIÐ Í MIÐLUNUM 2020

04.02.20 **Dagur og Vika.** Herleif Hammer. Um støðuna á Skansanum.
05.02.20 **Norðlýsið.** Grein um fornfrøðiligar leivdir í Ánunum.
25.02.20 **Breddin.** Leivur Janus Hansen um tilmæli viðvíkjandi gongd í lundalandi í Mykinesi.
15.04.20 **Góðan morgun Føroyar.** Bjørn Patursson um spreingihol í Koltri.
23.04.20 **Dagur og vika.** Súsanna Joensen og Herleif Hammer. Um eldsbruna í Kúrdali.
02.05.20 **Nær var tað?** Bjørn Patursson í spurnarkapping.
06.05.20 **Norðlýsið.** Um rannsóknir uppi á Grundum.
12.05.20 **Norðlýsið.** Stuttlig søga um "fýratalið", ið kom aftur.
17.05.20 **Norðlýsið.** Um toftirnar uppi á Grundum og um toftirnar úti í Grøv.
22.05.20 **Dagur og vika.** Leivur Janus Hansen um gøtu gjøgnum lundaland í Mykinesi.
25.05.20 **Dagur og vika.** Leivur Janus Hansen. Um ólógliga gøtu í friðaðum lundalandi.
25.05.20 **Dagur og vika.** Herleif Hammer. Um brunatrygd á goymslum Tjóðsavnsins.
27.05.20 **Norðlýsið.** Tíðindaskriv um, hvussu opið verður á Hvalastøðini.
09.06.20 **Dagur og vika.** Herleif Hammer. Um bakkaverju í Kirkjubø.
18.06.20 **Góðan morgun Føroyar.** Jón Aldará um gongd í haga, sum órógvar fuglin.
19.06.20 **Góðan morgun Føroyar.** Helgi D. Michelsen v.fl. um útgrevsturin á Bakka á Velbastað.
23.06.20 **Góðan morgun Føroyar.** Tórarinn Niclasen á Rípuni. Um summartúrarnar í Hoyvíksgarði.
23.06.20 **Góðan morgun Føroyar.** Símun V. Arge greiðir frá fornminnunum í Kirkjubø.
23.06.20 **Á Breddanum.** Helgi D. Michelsen um, hvussu grevsturin á Velbastað krevur nýtulking av søgu okkara.
23.06.20 **Norðlýsið.** Grein um kanningarnar hjá Tjóðsavninum í Gerðabø í Klaksvík.
08.07.20 **Norðlýsið.** Um fuglatúrarnar hjá Tjóðsavninum við Jón Aldará.
23.07.20 **Góðan morgun Føroyar.** Rannvá Winkler greiðir frá um serframsýning "Gløgt er gestsins eyga".
02.08.20 **Frítíð og náttúra.** Jón Aldará. Um ringmerking av kjógvapisum.
24.08.20 **Góðan morgun Føroyar.** Herleif Hammer, Ólavur Reinert og Annleyg Patursson. Um urtagarð í Hoyvík við føroyskum plantum.
26.08.20 **Jn.fo.** Petur Hansen. Um útgrevstur í Sandavági í sambandi við, at garaga skal gerast.
28.08.20 **Útvarpstíðindi.** Herleif Hammer um friðingaruppskotið um Hoydalar.
28.08.20 **Sosialurin og Dimmalætting.** Lýsing viðvíkjandi friðingaruppskoti av sanatoriibygningunum og fløtuni í Hoydølum.
28.08.20 **Útvarpstíðindi.** Um uppskotið um friðing av sanatoriibygningunum og fløtuni í Hoydølum.
14.09.20 **Nón.** Herleif Hammer um UNESCO arbeiðið á Tjóðsavninum.
23.09.20 **Norðlýsið.** Herleif Hammer um framleiðslu av taksteinum í Svínoy undir 2. veraldarbardaga.
02.10.20 **Vikuskiftissendingin.** Jón Aldará greiðir frá um fugl í Føroyum.
09.10.20 **Miðlahúsið.** Rannvá Winkler um Savnsfagnaðin.
12.10.20 **Góðan morgun Føroyar.** Palli Askham, Tórarinn N. á Rípuni og Rannvá Winkler um savnsfagnaðin á Tjóðsavninum.
17.12.20 **KvF.** Helgi D. Michelsen um finningarløn í sambandi við metaldetektorar.

# VITJANDI Á FRAMSÝNINGUNUM 2020

**Vitjanartølini í 2020 vóru nógv merkt av koronustøðuni í landinum, og vitjanartølini, sum øll hava verið í støðugari øking seinastu árini, ikki minst tølini av útlendskum vitjandi, fingu sum vera man eitt veruligt bakkast í 2020**

## BREKKUTÚN

**Vitjanartølini, sum ongantíð** høvdu verið so høg sum í 2019, lækkaðu í 2020 niður undir tað støðið, sum var í 2015. Tað, sum kann sigast at vera positivt er, at talið av vitjandi føroyingum er vaksið so nógv seinastu árini, at vitjanartølini í 2020 ikki vóru so lág, sum tey høvdu verið, um ferðafólk myndaðu allan vitjanarskaran.

## SAVNSFAGNAÐURIN

**Savnsfagnaðurin, sum hvørt** ár liggur í heystfrítíðini varð skipaður øðrvísi í 2020 fyri at frástøða og tilmælini sum heild kundu verða hildin. Tí var ein bókingarskipan nýtt gjøgnum Visit Tórshavn, har fólk kundu melda seg til at vitja á savnsfagnaðinum annaðhvørt kl. 11 ella kl. 14 allar 5 dagarnar. Tilmeldingarnar vóru avmarkaðar fyri at halda tilmælini. Hóast hetta hevði stórar avmarkingar við sær, so eydnaðist savnsfagnaðurin væl og var hann fullsettur við 1.053 børnum og vaksnum, sum vitjaðu á savnsfagnaðinum.

## HOYVÍKSGARÐUR

**Hoyvíksgarður hevði eisini** í 2020 opið hvønn dag frá mai - august og vóru har í alt 1.882 vitjandi, harav 67% vóru útlendingar. Eisini í Hoyvíksgarði vóru vitjanartølini munandi lægri enn í fjør, men hóast tað vóru tey hægri enn í 2017.

## HVALASTØÐIN VIÐ ÁIR

**Í 2019 var** fyri fyrstu ferð gjørligt hjá fólki at vitja og fáa ein rundvísing á Hvalastøðini við Áir. Tá var einans opið fríggjadagar, men í ár var opið hvønn seinnapart hósdag - sunnudag frá síðst í mai til síðst í august. Tað vitjaðu færri fólk enn í fjør, men fleiri bólkar vóru og



*Kjak um Moby Dick og vinnuliga hvalaveiði. Studentarnir á Føroyamálsdeildini inni í Smiðjuni*

vitjaðu, umframt nøkur arbeiðspláss, sum gjørdu útferð til Hvalastøðina. Eitt nú vóru studentar á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum á vitjan tann 10. juni. Jógvan Dalbø Hansen, sum hevði skeiðið 'Moby Dick í heimspekiligum ljósi', ynskti eina rundsýning á hvalastøðini fyri at fáa innlit í, hvussu ein hvalastøð sá út, tá ið hon var virkin. Innihaldið í skeiðinum var eyðvitað kenda skaldsøgan Moby Dick (1851) eftir Herman Melville, hvussu tann maritima tilveran var, og um ta vinnuligu hvalaveiðuna í Føroyum. Tað var tosað um vísindalig hugtøk, um náttúru og mentan, spurningar vóru um fortíð og nútíð, um bókmentir og søgufrøði.

Í alt vóru 573 vitjandi á hvalastøðini í 2020 í mun til 715 í 2019.




## KOLTUR

**Í savnshúsinum heima** í Húsi vitjaðu 252 gestir í 2020, sum er munandi færri enn í 2019, tá 432 gestir vitjaðu. Har verður ikki skrásett, hvørjir eru føroyingar og útlendingar.

## SERFRAMSÝNINGIN

**Einans ein serframsýning** var í 2020 orsakað av koronuumstøðunum, men hon var eisini sera væl umtókt. Talan var um myndir, sum Adam Woolfitt hevur tikið fyri viðurkenda blaðið National Geographic síðst í seksti árunum. Myndasavnið gav hann í 2018 Tjóðsavninum sum gávu, og útvaldar myndir vórðu sýndar fram á serframsýningini 'Gløgt er gestsins eyga'. Framsýningin var opin í auluni í Finsen í tíðarskeiðinum 23. juli til 9. august, har 908 fólk vitjaðu. Flestu teirra vóru føroyingar.

## UPPLIVINGARTÚRAR

**Sum eitt nýtt** tiltak var skipað fyri upplivingartúrum á sumri 2020, har serfrøðingar frá Tjóðsavninum greiddu frá spennandi evnum. Hetta kann sigast at vera eitt positivt úrslit av koronustøðuni, tí hugsað varð, at neyðugt var við uttandura tiltøkum og at fólk, sum kanska høvdu ætlað sær uttanlands í summar, kundu fáa góðar og gevandi upplivingar í Føroyum. Túrarnir vóru ymsastaðni í landinum og vóru bæði um fuglar, skordýr, blómur, tara, fornfrøði, hvalaveiðu, søgu og sjórænarar á Skansanum. 266 fólk, bæði vaksin og børn, luttóku á upplivingartúrunum.



*Vitjandi 2020*



# STARVSFÓLK, SUM ERU BYRJAÐ ELLA GIVIN Í 2020

Tjóðsavninum tørvaði ein konservator afturat, sum var serkønur í konservering av djórum. Trupult var tó at finna skikkað fólk í Føroyum. Tískil varð farið út um landoddarnar við lýsing eftir konservatori og tá eydnaðist. Danska **Young-Mee Rim**, sum er Cand.scient.kons. frá Det Kongelige danske kunstakademis skoler for arkitetur, design og konservering í Keypmannahavn søkti og fekk starvið. Í illfýsna veðrinum í januar mánaði flutti Young saman við manninum og lítla soni teirra til Føroya, tá hon byrjaði í starvinum.

**Sune Strøm** var settur sum savnshandverkari frá 15. juni 2020. Talan var um eitt nýtt starv, har høvuðsuppgávan er at røkja søguligu bygningar Tjóðsavnsins umframt at samstarva við hinar deildirnar tvørtur um fakmørk. Sune er útbúgvin timburmaður og hevur drúgvar royndir at restaurera og viðlíkahalda søguligar bygningar, umframt sethúsabygging og umvælingar.

**Jón Aldará** hevur verið knýttur at Tjóðsavninum síðani 2016 og byrjaði í føstum starvi sum lívfrøðingur á djóradeildunum í apríl mánaði. Jón er M.Sc. í lívfrøði frá Keypmannahavnar Universiteti. Í 2016 fekk Jón ringmerkingarloyvi og hevur síðani tá áhaldandi kannað og merkt fugl.

Í juli mánaði byrjaði **Anna Maria Bengtsson**, sum hevur drúgvar royndir sum reingerðafólk, at gera reint á Tjóðsavninum.

1. desembur byrjaði **Kolbrún í Haraldstovu** í starvi sum plantufrøðingur á Tjóðsavninum. Kolbrún varð liðug sum M.Sc. í Umhvørvisfrøði frá Keypmannahavnar Universiteti og Landbúnaðar Universitetinum í Uppsala í Svøríki í 2020. Kolbrún er ikki eitt ókent andlit á Tjóðsavninum og umframt at vera savnsvakt í framsýningunum í fleiri ár, hevur hon eisini hjálpt Onnu Mariu Fosaa og síðani Magnusi Gaard í GLORIA plantuátakinum, har hon greinaði og eyðmerkti plantusløg á føroysku fjallatindunum.

Uttanríkis- og Mentamálaráðið hevur í 2020 lagt uppgávuna at arbeiða við UNESCO-sáttmálanum um verju av siðaarvi til Tjóðsavnið. Tískil varð søkt eftir savnsvørði til fólkalívsdeildina, sum umframt hesa uppgávu skal loysa vanligar savnsuppgávur á deildini. **Kristina Djurhuus Christiansen**, sum er sosialantropologur, M.Sc. frá Universitetinum í Lund byrjaði í starvinum 1. desembur. Kristina hevur drúgvar royndir bæði sum savnsvørður og -vertur á krígssavninum á danska Nationalmuseuminum. Eisini hevur hon verið savnsvørður og prosjektassistentur í sambandi við, at danska Nationalmusumið hevur umvælt søguligar danskar bygningar í indiska býnum Serampore.

Fornfrøðingurin **Símun V. Arge**, sum á mangan hátt hevur verið ímyndin av Tjóðsavninum, fór frá fyri aldur í septembur. Hann var tó knýttur at savninum í eini sokallaðari Emeritus-skipan, ið er vanlig at brúka á granskingar- og útbúgvingarstovnum.

**Agnes-Katharina Kreiling**, lívfrøðingur ph.d. var fyrst projektsett á landdjóradeildini og síðani sett í farloyvisstarv fyri Young, sum fór í barnsburðarfarloyvi.

*Starvsfólk 2020:*



Herleif Hammer
Stjóri



Kim J. Clementsen
Húsavørður



Hákun Andreasen
Savnsteknikari



Jóannes Stephansson
Savnsteknikari



Súsanna Joensen
Konservator



Tórarinn N. á Rípuni
Savnslærari



Rannvá D. Djurhuus
Skrivstovufólk



Helgi D Michelsen
Savnsvørður, fornfrøðideild



Leivur Janus Hansen
Savnsv., landdjóradeild



Tórálvur Weihe
Savnsarkitektur, bygningsd.



Jón Aldará
Lívfrøðingur



Sanna Hansen
Fíggjarfulltrúi



Herdis H. Jacobsen
Savnshjálpari



Ólavur H. Øster
Savnsteknikari



Bjørn Patursson
Fyristøðumaður, Koltur



Josefina Dam Haraldsen
Journal



Erland Viberg Joensen,
Savnsvørður, fólkalívsdeild



Palli Askham
Savnslærari/KT-vørður



Rannvá Winkler
Savnsvørður



Elsuba Olsen
Bókhald



Jan Sørensen
Savnsvørður, sjódjóradeild



Símun V. Arge
Ráðgevi og granskari



Ann Sølvia S. Purkhús
Fornfrøðingur



Agnes-Katharina Kreiling
Lívfrøðingur



Sune Strøm
Savnshandverkari



Young-Mee Rim
Konservator



Anna Maria Bengtson,
Reingerð



Kristina D Christiansen
Antropologur



Kolbrún D. í Haraldsstovu
Savnsvørður, plantudeild

# HÁTÍÐARHALD FYRI SÍMUNI V. ARGE

**Fríggjadagin 18. septembur 2020 var stórfingin móttøka í framsýningarhølum Tjóðsavnsins í Brekkutúni 5 í sambandi við, at Símun V. Arge eftir 50 ár á Tjóðsavninum (Føroya Fornminnissavni og Søvnum Landsins) fór frá 30. septembur 2020**

**Móttøkan var fyri** innbodnum, og orsakað av koronastøðuni var markið 100 fólk. Tey innbodnu vóru starvsfelagar á savninum og uttanfyri savnið, umboð fyri stovnar og feløg, vinfólk og familja.

Eftir at stjórin á Tjóðsavninum, Herleif Hammer, hevði bjóðað vælkomin, fekk Símun orðið. Hann hugleiddi um sítt arbeiðslív á stovninum og um tær góðu og onkuntíð avbjóðandi løtur, sum arbeiðið hevði givið honum. Eftir Símun tóku fleiri onnur orðið m.a. Súsanna Joensen, ið er tað starvsfólkið, sum hevði starvast saman við Símuni longst. Eisini formaðurin í Yvirfriðingarnevndini, Henrik Møller, sorinskrivari, hevði eina viðkomandi og stuttliga røðu fyri Símuni, sum í eitt áramál hevur sitið í nevndini.

Í sambandi við móttøkuna var eisini lítil framsýning sett upp. Hetta var ein eitt sindur øðrvísi framsýning, tí ikki var evnið forn- og mentaminni ella aðrir sjáldsamir lutir, men í staðin eitt av starvsfólkum savnsins. Nakrir av starvsfeløgunum høvdu sett saman eina fjølbroytta framsýning við myndum, avísklippum og ymiskum lutum, ið Símun hevði átt sum barn, m.a. klæðir og leikur.

Millum røðurnar bjóðaði Tjóðsavnið ein léttari bita, sum kokkurin Gutti Winter stóð fyri, samstundis undirhelt blues sangarin Uni Debess við nøkrum løgum.



*Herleif Hammer, stjóri, bjóðar vælkomin*



*Símun V. Arge hugleiðir*



*Henrik Møller, sorinskrivari og formaður í Yvirfriðingarnevndini*



*Spælibilurin, ið Símun spældi við sum barn, er eisini á savninum. Hann var vístur fram til høvið*



*Dópsklæði Símunar eru í varðveitslu á savninum og vóru sýnd fram til tiltakið*



*Avísklipp í sambandi við arbeiðslív Símunar*



*Til slík høvi hittast fyrrverandi starvsfelagar. F.v. Arne Thorsteinsson, Jóan Pauli Joensen og Josefina Dam Haraldsen*



*Gutti Winther presenterar matin*



*Uni Debess undirheldur*



*Theodor Anskarius Hansen og Símun práta í sambandi við grevstur úti á Reyni 1984*



*Símun á skrivstovu síni 1996*

# Símun millum ár og dag

## Tá fráfaringarløta var fyri Símun V. Arge, vardi tað ongan, at tá ársfrágreiðingin fyri árið 2020 varð skrivað, var hann ikki longur okkara millum

**Til fráfaringarløtuna vórðu** myndir funnar fram av Símuni í ymsum høpi til arbeiðis eins og í vertsskapi.

Umframt at ríka okkum við sínari stóru vitan um fornfrøði, náttúru og djóralív, so ríkaði Símun eisini okkara gerandisdag við skemti, frásøgnum, forvitni, arging og áhuga fyri mati. Ofta brellaðist hann eftir kaku ella onkrum søtum og valdi heilt vist heldur ein "spandauera" enn ein grovan bolla aftur við kaffinum.

Hesar myndir kunnu kanska betri enn orð lýsa okkara góða starvsfelaga tey fimmti árini, hann var ein partur av savninum.



*Í Eystrum. Símun og Arne Thorsteinsson á arbeiðsvitjan í 1984*



*"Fernisúlvurin" verður flotaður. Símun Johan Wolles smíðaði savninum henda bát í 1990. Fv. Sínum Arge, Leon Andreasen, Bárður Jákupsson og Jóan Pauli Joensen*



*Í Húsavík. Símun, Hanus undir Leitinum, Oystein Ekroll og onnur luttakandi á ruinseminarinum 2007*



*Símun greiðir norðurlendingum frá grevstrinum á Sondum 2007*



*Símun og Lisbeth L. Petersen, borgarstjóri, tá latið varð upp í Brekkutúni 1996*



*Grevstur Heima á Sandi. Símun vegleiðir fornfrøðilesandi í sambandi við verkætlanina Heart of the North Atlantic*



*Nordisk Ruinseminar í Kirkjubø 2007. F.v. Súsanna Joensen, Símun V. Arge, Mona Beate Buckholm, Andras Mortensen og Hákun Andreasen*




*Tey fimm. F.v. Jóannes Stephansson, Elsuba Olsen, Súsanna Joensen, Josefina Dam Haraldsen og Ólavur Øster*

# Fimm starvsfólk vóru heiðrað

**Fyrrapartin 23. oktobur** var serligt tiltak í Brekkutúni. Fimm av starvsfólkum savnsins vóru heiðrað, tí tey høvdu starvast á savninum í 30, 40 og 45 ár. Hesir starvsdagarnir vóru ikki allir í 2020, men hetta tiltakið var ein samanlegging av fleiri hátíðarhaldum.

Fyri ein vitanarstovn sum Tjóðsavnið er alneyðugt, at fólk trívast og verða leingi í starvinum, so vitanin og royndirnar kunnu vaksa. Á Tjóðsavninum verður mett, at tað er av stórum týdningi at hátíðarhalda slíkar dagar og geva starvsfólkunum viðurkenning fyri at hava nýtt so stóran part av lívi teirra at tæna stovninum.

Ólavur Øster og Josefina Dam Haraldsen vóru heiðrað fyri at hava starvast á savninum í meiri enn 45 ár, Súsanna Joensen fyri 40 ár, Elsuba Olsen og Jóannes Stephansson fyri 30 ár.

Tiltakið var fyri øll starvsfólk á Tjóðsavninum og fyri tey nærmastu hjá teimum heiðraðu.



*Josefina Dam Haraldsen og Elsuba Olsen fáa handað pakka frá Rannvá D. Dahl*



*Ólavur Øster og konan Oddvør Øster. Ólavur hevur arbeitt á savninum síðani 1973*



*Súsanna Joensen hevur starvast 40 ár á savninum sum konservator*



# SUMMARY IN ENGLISH

**For most museums** locally and internationally, including the Tjóðsavnið (National Museum), 2020 was a peculiar year. On March 15, 2020 museum staff were asked to work from home, take remaining vacation and deal with any other time-off they were due. At the same time events were cancelled or postponed, and our exhibitions were closed. When the situation improved in May, people came back to their workplaces and exhibitions were reopened, albeit with due regard to all recommendations. As most others in the Faroes working in tourist and experience business we expected 2020 to be a year with record numbers of visitors at the Tjóðsavnið. This was not the case, but according to circumstances we still had quite a few visitors – both Faroese and foreigners.

**The Corona situation** also impacted on our plans for the year, e.g. a new exhibition about wool was postponed for a year, and travel plans around the Faroes involving a photo exhibition were abandoned.

**But as the** saying goes: "where one door closes, another opens". This was true at the Tjóðsavnið as well. Since exhihition activities were reduced, planned conferences cancelled, as well as all travelling abroad, energy and resources were released for other activities.

**Our wish to** establish a botanical garden in Hoyvík came true, and we plan public opening during the summer 2021. Many repairs were conducted on our historical buildings both outside and inside, and improvements were also done to the exhibitions and the storage room in Brekkutún.

**Although several exhibitions** already planned didn't materialize, we held on to a large exhibition with photographs by the British photographer Adam Woolfit. The Corona situation was tolerable during the summer 2020 so we considered it safe to open the exhibition in the spacious premises in Finsen.

**Visit Faroe Islands** launched a campaign in the summer 2020 called "Travel in Your Own Country". The aim was to support the tourist industry, but also to provide holiday experiences for the Faroese since the possibilities to travel abroad were poor. At the Tjóðsavnið we adopted this idea, and along with Visit Tórshavn we arranged summer events during which people in the Faroes had the opportunity to experience Faroese nature and history together with a specialist from the Tjósavnið. The Tjósavnið invited people to nine different events, which were: flower outing, insect outing, bird outing, weed outing, sea shore outing, tour of Kirkjubøur, tour of Hoyvík farm, tour of archaeological excavation in Velbastaður, and pirate games on the Skansin in Tórshavn.

**One of the** biggest events at the Tjóðsavnið is the *Museum Festival* during the autumn school break. It used to be enjoyable and lively days with a large number of visitors, particularly children. The event could not be carried out as usual, but we decided in accordance with the Corona Counselling to let 100 persons in at a time and have people sign up. The project was a success, it did not gather as many visitors as in preceding years, but better organized circumstances made for better quality of what was on offer for the visitors.

**Much of the** work in the museum was hardly affected by the corona crisis, mainly because many of the activities during summer are conducted outdoors encompassing field work, research, and registration. Besides, much of the work at the museum is done by individuals in their own offices and labs.

**All things considered** it was a very active year, but also a peculiar one with a difficult start turned into something positive by the innovation and creativity of the staff of Tjóðsavnið.



*Mynd: Adam Woolfitt; frá serframsýningin “Gløgt er gestsins eyga”*




**tjodsavnid.fo**

**FRAMSÝNING**
Brekkutún 6
Hoyvík

**FYRISITING**
Kúrdalsvegur 15
Hoyvík
+298 340 500
tjodsavnid@savn.fo